Álit um

# ÚTBÚGVINGAR INNAN FISKIVINNUNA



## INNIHALDSYVIRLIT

**1 Formæli** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **5**

**2 Arbeiðssetningurin** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **7**
2.1 Tilnevning og arbeiðssetningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
2.2 Ymsir tættir í nevndararbeiðinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
2.3 Stevnumið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

**3 Framtíðar tørvur og framtíðar krøv á førleikum í fiski- og alivinnuni** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **12**
3.1 Tørvur á nýggjum førleikum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
3.2 Útbúgving og menning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
3.3 Ein broytt vinna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
3.4 Førleikakrøv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14

**4 Verandi útbúgvingarviðurskifti** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **15**
4.1 Fiskivinnuskúlin í Vestmanna – ein miðnámsskúli . . . . . . . . . 15
4.2 Útbúgvingar á Fiskivinnuskúlanum í framtíðini . . . . . . . . . . . 17
4.3 Fróðskaparsetrið – Náttúruvísindadeildin . . . . . . . . . . . . . . . 18
4.4 Útbúgvingar á Setrinum í framtíðini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
4.5 Støðan hjá ali- og fiskivinnuni í dag . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
4.6 Rekrutteringsspurningurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21

**5 Hvat kann gerast í Føroyum ?** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **24**
5.1 Alment . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
5.2 Samstarv millum vinnu og gransking . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25

**6 Felags stovnur í miðøkinum** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **26**
6.1 Alment . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
6.2 Útbúgving og tænastuvirksemi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
6.3 Fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøðin – fortreytir . . . . . . . . . . 27
6.4 Annað sum dregur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28

**7 Tilmæli frá nevndini** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **30**
7.1 Innihald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
7.2 Rekruttering . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
7.3 Skipan av miðstøðini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
7.4 Stýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31
7.5 Eftirútbúgvingarskeið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

**8 Kostnaður** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **32**

9 **Uppskot til lóg um útbúgvingar innan fiskiídnað og havbúnað** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **34**

**10 Samandráttur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **38**



# FYLGISKJØL

## Bólkafrágreiðingar

**A) Skeið . . . . . 39**
Inngangur . . . . . 39
Bakgrund - hví er eftirútbúgving neyðug? . . . . . 39
Broyttar umstøður . . . . . 40
Spurnarkanning . . . . . 40
Niðurstøður um tørvin á eftirútbúgving . . . . . 41
Dømi um eftirútbúgving innan fiskivinnu higartil . . . . . 42
SAM-skeiðini í Klaksvík . . . . . 42
Skeið í innaneftirliti . . . . . 43
Skeið í fiskaaling . . . . . 43
Eftirútbúgvingartilboð til fiskiídnað, fiskiflota og alivinnu . . . . . 44
Viðkomandi skeiðstilboð til fiskiídnað, fiskiflota og alivinnu . . . . . 44
Viðmerkingar til uppskotini . . . . . 45
Tørvurin á útbúgving í øðrum vinnugreinum . . . . . 46
Skeiðsútbjóðarar og undirvísingarkreftir . . . . . 46
Skipan av skeiðstænastu Fiskivinnuskúlans . . . . . 47
Uppbygging og skipan av eftirútbúgving . . . . . 48
Alment . . . . . 48
Samskipan av eftirútbúgvingini . . . . . 48
Ráðgevandi nevnd . . . . . 49
Fígging . . . . . 49
Marknaðarføring av eftirútbúgvingini . . . . . 51
Úrslit av spurnarkanningini . . . . . 52

**B) Útbúgving . . . . . 68**
Alment . . . . . 68
Stevnumið . . . . . 68
Fortreytir . . . . . 68
Støðisárið . . . . . 69
Annað árið . . . . . 70
Triðja árið . . . . . 70
Yvirlit yvir útbúgvingina . . . . . 70
Tær báðar breytirnar . . . . . 72
Fíggjarligar avleiðingar . . . . . 75

**C) Verkætlanir og støðið undir teimum . . . . . 76**
Fortreytir . . . . . 76
Um matvøruútbúgving og –gransking . . . . . 76
Granskingarumhvørvið í Føroyum . . . . . 77
Uppskot um BS í matvøruverkfrøði . . . . . 78
Upptøkan í 2001, lívfrøði . . . . . 80

Sambandið við vinnuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 80
Fígging av verkætlanum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 80
Tilmæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81

**D) Tænastur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82**
Alment um hví tænastur av ymsum slag eiga at fara fram á eini miðstøð saman við undirvísing og førleikamenning annars . . . . . . 82
Tænastur til vinnuna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Støðan sum er og tørvurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 83
Royndarhøli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 86
Kunningartænastur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 86
Tilmæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 87

**E) Kort yvir havbúnaðin og fiskiídnaðin í Føroyum . . . . . . . . . . 88**

**F) Nøkur sjónarmið um framtíðar førleikar . . . . . . . . . . . . . . . . 90**

# 1. FORMÆLI

Við hesum leggur nevndin, ið landsstýrismaðurin í mentamálum setti í februar 2000, fram álit um útbúgvingar innan fiskivinnuna.

Nevndin metir, at talan hevur verið um eitt rættiliga víðfevnt arbeiði, sum í stóran mun hevur snúð seg um tørvin á førleikamenning hjá vinnuni í víðari merking, og samstundis ber til at siga, at brotið er upp úr nýggjum. At nýhugsan er neyðug, er nevndin sannførd um, um tær broytingar, sum arbeiðssetningur hennara leggur upp til, skulu gerast veruleiki komandi árini.







Nevndin er av teirri áskoðan, at okkara høvuðsvinnur eiga at fara undir hesa førleikamenningina, og at útbúgving, menningarætlanir og tænastur av ymsum slagi eiga at samskipa sínar leiklutir mest møguleika í hesum sambandi. Hetta gerst best við at stovnseta eina miðstøð, sum arbeiðir við hesum sum høvuðsmáli, og sum hevur góðar umstøður til virksemi sítt. Mett verður, at tíðin nú er búgvin til, at verandi stovnar kasta saman um virksemið á stovninum á tann hátt, at útbúgvingarnar, ið fara fram á Fiskivinnuskúlanum, verða fyrsti grundarsteinurin undir miðstøðini, og at tænastur til vinnuna – kanningarstova og royndarhøll, umframt upplýsandi virksemi – verða lagdar afturat komandi árini. Gjørt skal verða vart við, at tað ikki er ætlanin, at virksemi skal flytast frá verandi stovnum, men heldur at virkisøki, sum higartil hava ligið á láni, verða løgd til miðstøðina.

Tá ið talan er um skeiðsvirksemi, er givið, at ikki øll førleikagevandi skeið til ali- og fiskivinnuna kunnu fara fram á einum staði í landinum, og tí metir nevndin, at miðstøðin kann samstarva við útbúgvingarstovnar kring landið um ein part av hesum skeiðum, soleiðis at fólk sleppa á skeið so nær sínum heimstaði sum til ber.

Fiski- og alivinnan er í støðugari menning í hesum árum. Roynt verður at gagnnýta tað tilfeingi, sum fæst úr sjónum sum frægast, men ein slík menning kemur ikki av sær sjálvari. Tí mugu øll áhugamál í landinum virka út frá eini heildarætlan og samantvinna sítt arbeiði mest møguligt. Við at hava eitt stað, har partarnir hittast, verður grundarlag lagt fyri eini felags kós, ið er so neyðug, um føroyska samfelagið skal fáa nakað munagott burtur úr teimum verkætlanum, ið vísa á nýggjar møguleikar.

Krøvini til eftirlit við úrdráttunum, ið vinnan framleiðir, gerast støðugt strangari. Hetta hevur við sær eitt stórt tal av royndum, ið skulu gerast á kanningarstovu, og væntast kann, at tørvurin fer at vaksa enn meira í framtíðini. Við hesum í geyma eigur at verða umhugsað, um ein partur av hesum royndum kunnu verða gjørdar í undirvísingar- og menningarumhvørvinum, ið nevnt er omanfyri.



Hóast vælferðin í samfelagi okkara í sera stóran mun byggir á fiski- og alivinnuna, er rættiliga avmarkað, hvussu nógv orka verður nýtt til at kunna um viðurskiftini í hesum vinnum. Skulu úrslitini av ymsum verkætlanum hava árin, má kunningarparturin ikki liggja eftir. Umframt at gera hesi úrslit atkomilig, liggur eisini ein uppgáva í at útvega tilfar til undirvísing á ymsum stigum. Tá ið slíkt tilfar, ið javnan eigur at verða dagført, verður tikið inn í undirvísingina á ein natúrligan hátt, er vón um, at uppvaksandi ættarliðið gerst meira tilvitandi um lívsgrundarlagið hjá føroysku tjóðini – og at fleiri fara at velja sær eina yrkisleið innan fiski- og alivinnuna.

Breið semja man vera um, at nýggj førleikakrøv fara at verða sett teimum, ið skulu starvast í fiski- og alivinnuni í framtíðini. Tað eru hesi krøv, ið ein samskipaður útbúgvingar- og menningarpolitikkur eigur at ganga á møti og sum hetta álit vónandi kann geva sítt íkast til.

Um Jóansøkuleitið 2001

*Guðrið Andórsdóttir, formaður*

| | |
|---|---|
| *Regin Jacobsen* | *Rógvi Reinert* |
| *Jákup Andreasen* | *Andras Kristiansen* |
| *Jóhanna á Bergi* | *Marita Vang Rasmussen* |
| *Jákup Sólstein* | *Ingeborg Winther* |
| *Bárður Enni* | *Súni Poulsen* |
| *Hjalti í Jákupsstovu* | *Hans Pauli Joensen* |

*Hans Andreas Dam Joensen, skrivari*

# 2 ARBEIÐSSETNINGURIN

## 2.1 Tilnevning og arbeiðssetningur

Signar á Brúnni, landsstýrismaður, tilnevndi í skrivi, dagfest 23. februar 2000, limir í nevnd at gera álit um útbúgvingar innan fiskivinnuna.

Hesi vóru sett í nevndina:

Guðrið Andórsdóttir, Føroya Fiskavirking
Hans Andreas Dam Joensen, Mentamálastýrið
Regin Jacobsen, Bakkafrost
Rógvi Reinert, Faroe Seafood
Jákup Andreasen, Fiskivinnuskúlin
Heðin Joensen, Fiskimálastýrið
Jóhanna á Bergi, Kósin Seafood
Marita Vang Rasmussen, Føroya Arbeiðsgevarafelag
Óli Jacobsen, Føroya Fiskimannafelag
Jákup Sólstein, Føroya Reiðarafelag
Ingeborg Winther, Føroya Arbeiðarafelag
Bárður Enni, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Súni Poulsen, Menningarstovan
Maria Róin, Vinnumálastýrið
Hjalti í Jákupsstovu, Fiskirannsóknarstovan
Hans Pauli Joensen, Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya.







Í arbeiðssetningi nevndarinnar verður m.a. sagt, at hon skal ”koma við uppskoti um ein útbúgvingar- og menningardepil, har:

- undirvísing og menningarvirksemi innan fiskivinnuna eru savnað saman í eina natúrliga eind
- undirvísingin í stóran mun byggir á verkligt grundarlag, eisini gjøgnum skeiðsvirksemi
- ein tænasta er á deplinum, ið vinnulívið ger støðuga nýtslu av, t.d. starvsstovur
- samstarv er við aðrar útbúgvingar, gransking og stovnar innan sama øki, bæði heima og uttanlands
- útbúgvingarstovnurin og vinnan nýta servitan og útgerð hjá hvørjum øðrum
- gingið verður á odda í menningartiltøkum í fiskivinnuni
- leiðslubygnaðurin er skipaður soleiðis, at áhugabólkarnir innan vinnuna kunnu gera seg galdandi.”

Eisini verður sagt, at ”nevndin eigur at miða ímóti, at útbúgvingarnar verða tilevnaðar á teimum stigum, sum vinnan verður mett at hava tørv á, bæði á sjógvi og á landi.

1. Skeiðseindir í ymiskum vavi til tey, ið arbeiða við fiski, bæði á sjógvi og á landi. Sum dømi kunnu nevnast: innaneftirlit, goymsla

(køling/frysting), hagreiðing av feskum fiski, saltfiskavirking, skeljadjór, reinføri, fiskamjølsídnaður, royking, niðursjóðing
2. Útbúgving, ið gevur serligan førleika á fiskavirkjum, innan aling og matvøruframleiðslu annars, har stakar lærugreinir frá skeiðseindunum møguliga eru við
3. Verkætlanir í sambandi við hægri útbúgving, umframt menningarvirksemi, samskipað við viðkomandi stovnar.





Nevndin verður eisini biðin um at gera eitt ítøkiligt uppskot um tær tænastur, ið ætlandi fara at liggja á stovninum, bæði tá tað snýr seg um eftirlits- og kanningararbeiði eins og um menningararbeiði. Harafturat kunnu aðrar uppgávur gera seg galdandi, t.d. upplýsandi virksemi og tilfar, sum nevndin eigur at meta um."



Biðið var eisini um, at álitið frá nevndini fevnir um eitt uppskot til lóg um útbúgvingar innan fiskiídnað og havbúnað.

Heitt var á nevndina, um at gera arbeiði sítt liðugt innan 1. desember 2000.

## 2.2 Ymsir tættir í nevndararbeiðinum

Á fyrsta fundinum 3. mars 2000, har landsstýrismaðurin luttók, var avrátt nærri um nevndararbeiðið. Hildið var, at ein so stór nevnd í fyrstu syftu átti at býta seg í undirbólkar, ið skuldu arbeiða við hesi evni:

1. *Skeiðseindir* í ymiskum vavi til tey ið arbeiða við fiski, bæði á sjógvi og á landi.
   Súni Poulsen,
   Óli Jacobsen,
   Jákup Andreasen,
   Jákup Sólstein,
   Hans Andreas Dam Joensen.

2. *Útbúgving* ið gevur serligan førleika á fiskavirkjum, innan aling og matvøruframleiðslu annars, har stakar lærugreinir frá skeiðseindunum møguliga eru við.
   Jákup Andreasen,
   Ingeborg Winther,
   Marita Vang Rasmussen,
   Rógvi Reinert,
   Jóhanna á Bergi,
   Hans Andreas Dam Joensen.

3. *Verkætlanir* í sambandi við hægri útbúgving, gransking og menning, samskipað við viðkomandi stovnar.
   Heðin Joensen,
   Hjalti í Jákupsstovu,
   Hans Pauli Joensen,
   Guðrið Andórsdóttir,
   Hans Andreas Dam Joensen.



4. *Tænastur*, ið ætlandi fara at liggja á stovninum, bæði tá tað snýr seg um eftirlits- og kanningararbeiði eins og um menningararbeiði.
   Bárður Enni,
   Regin Jacobsen,
   Maria Róin,
   Marita Vang Rasmussen,
   Hans Andreas Dam Joensen.





Teir 4 bólkarnir arbeiddu síðan hvør í sínum lagi restina av árinum. Hjá onkrum bólki gjørdist arbeiðið væl drúgvari enn væntað, og tí vóru ikki øll úrslitini tøk fyrr enn tíðliga í vár, tá ið samlaða nevndin aftur fór til verka at skriva felags álit. Hetta felags álit fevnir um eina lýsing av verandi útbúgvingarviðurskiftum, eins og av framtíðar krøvunum til førleika. Eisini verður spurt um, hvat vit kunnu gera í Føroyum fyri at skapa størri samband millum vinnuna øðrumegin og útbúgving og gransking hinumegin. Eitt svar metir nevndin vera, at ein felags stovnur, har partarnir koma saman, verður skipaður, og verður hesin nærri lýstur í tilmælinum seinni í álitinum. Harafturat er gjørt uppskot til lóg um útbúgvingar innan fiskiídnað og havbúnað, ið er ein dagføring av verandi gymnasialu útbúgvingunum á Fiskivinnuskúlanum.

Tá ið nevndin var sett, boðaði Maria Róin úr Vinnumálastýrinum frá, at hon metti, at Bárður Enni umboðaði áhugamálini hjá Vinnumálastýrinum, og tessvegna hevur hon ikki luttikið í nevndararbeiðinum. Á sumri 2000 tók Óli Jacobsen seg burtur úr nevndararbeiðinum. Eisini hava onkur onnur fólk, enn tey, ið upprunaliga vóru tilnevnd, luttikið í nevndararbeiðinum: Jógvan Norðbúð hevur luttikið vegna Reiðarafelagið, eins og Andras Kristiansen og Jens Helgi Toftum úr Fiskimálastýrinum hava avloyst Heðin Joensen seinastu tíðina.

## 2.3 Stevnumið

Áðrenn nevndararbeiðið fór í gongd, sat ein arbeiðsbólkur undir Mentamálastýrinum, ið hevði til uppgávu at gera eitt útgreiningararbeiði um útbúgvingarspurningar í sambandi við fiskivinnuna. Bólkurin handaði ”Frágreiðing um førleikaviðurskifti og útbúgvingartørv í føroyskari fiski-

vinnu" 26. apríl 1999, ið stýrið metti vera eitt gott grundarlag undir eini framhaldandi viðgerð av spurninginum, og undir einum tilmæli um, hvussu vit menna okkara skúlaskap á hesum øki.

Harafturat hevur Fiskivinnuskúlin gjørt sítt tilmæli um eina framtíðar menning av skúlanum í oktober 1998.

Í báðum førum verður mælt til, at tørvurin hjá vinnuni fyri ymsum skeiðum verður gingin á møti. Harafturat hevur skúlin mælt til, at alivinnan fær eina serliga breyt á skúlanum, hevur kanningar-og royndarvirksemi fyri vinnuna, fremur vørumenning og í ein ávísan mun eisini gransking.

Út frá hesum kom Mentamálastýrið til ta niðurstøðu, at fiskivinnuútbúgvingar eiga at vera sæddar í so breiðum samanhangi sum møguligt, og at umboð fyri vinnuna, saman við øðrum áhugaðum pørtum, eiga at taka støðu til menningarmøguleikarnar hjá fiskivinnuni í útbúgvingarhøpi og gera sítt tilmæli.

Landsstýrismaðurin avgjørdi tí í samráði við landsstýrismenninar í vinnumálum og fiskivinnumálum at seta eina nevnd at koma við tilmæli um:



> "Hvussu skipast kann fyri einum *felags stovni*, hvørs fremsta endamál er at menna fiskivinnuna á sjógvi og á landi. Hesin stovnur skal bæði veita vinnuni ávísar tænastur og standa fyri teimum útbúgvingum, ið tørvur er á. Endamálið er at knýta útbúgvingar innan fiskivinnuna og havbúnaðin til ein menningardepil, har útbúgvingarnar kunnu virka saman við øðrum tænastum, ið eru tengdar at vinnuni. Hugsað verður her um eitt fjølbroytt virksemi, har einstøku deildirnar í einum menningardepli fyri okkara høvuðsvinnu ganga saman um at virka til gagns fyri hana í øllum liðum og tí umhvørvi, hon er knýtt at."



Samstundis sum nevndararbeiðið er farið fram, hevur ein arbeiðsbólkur, ið Yrkisútbúgvingarráðið setti á heysti 2000, mælt til eina 3 ára yrkisútbúgving innan fiskiídnað og alivinnu, sum í mestan mun verður samskipað við støðisárinum innan fiskivinnu (nærri um støðisárið í skjal B). Við eini slíkari útbúgving, sum hesin arbeiðsbólkur sambært sínum upplýsingum metir stóran tørv vera á, verður arbeiðið við at tilvirka og ala fisk lyft upp á sama førleikastøði sum tað, ið er vanligt innan flestøll onnur yrki í dag. Arbeiðsbólkurin metir somuleiðis, at útbúgvingin, har eitt støðisár við almennandi lærugreinum er týðandi táttur, fer at økja munandi um áhugan millum tey ungu fyri at velja eina yrkisleið innan



fiski- og alivinnuna, júst tí at útbúgvingin fer at hava somu støðu sum aðrar yrkisútbúgvingar, men eisini tí, at útbúgvingin skal kunna vera grundarlag undir framhaldandi útbúgving, um hugur er fyri tí. Við hesum útbúgvingarbygnaði kann væntast, at ein støðisútbúgving natúrliga gerst partur av eini yrkisútbúgving og at tann skilnaður, ið higartil er gjørdur millum miðnáms- og yrkisútbúgvingar ikki longur verður so týðiligur. Uppskotið um hesa yrkisútbúgving er nærri lýst á s. 17.

Tilsamans eru hesar ætlanir tekin um, at áhugi er hjá øllum pørtum at seta førleikamenning innan fiski- og alivinnuna ovarlaga á dagsskránna, so at vinnan hevur arbeiðsmegi, ið er búgvin til at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum koma í hesum árum. Skal ein framhaldandi menning fara fram, má útbúgving metast sum ein sera týðandi fortreyt.







# 3. FRAMTÍÐAR TØRVUR OG FRAMTÍÐAR KRØV Á FØRLEIKUM Í FISKI- OG ALIVINNUNI

Føroyska fiski- og alivinnan hevur tørv á útbúnum fólki. Skal vinnan framhaldandi vera kappingarfør á marknaðunum, er tað neyðugt, at vinnan og samfelagið hava førleikar til tøkniliga menning, vørumenning, sølumenning o.s.fr.

## 3.1 Tørvur á nýggjum førleikum

Krøv til umstilling og endurnýggjan er ein høvuðsspurningur, bæði í vinnulívinum, hjá tí almenna og í samfelagnum yvirhøvur. Vit liva í einum samfelagi, sum alla tíðina er í broyting, og fiski- og alivinnan er ikki nakað undantak í hesum høpi. Tað hevur sera stóran týdning, at vinnan hevur arbeiðsmegi og førleikar, sum gera hana føra fyri at taka í brúk nýggjan kunnleika og alla tíðina arbeiða við menning av nýggjum vørum og tænastum.

Fiski- og alivinnan má tey næstu árini gera átøk, sum sannføra ungdómin um, at hetta er ein framtíðarvinna, sum tað loysir seg at satsa uppá, har møguleikar eru at fáa áhugaverd størv, og har góðir pengar eru at vinna.

Væntandi er møguleikin fyri virðisøking í fiski- og alivinnuni enn størri enn tað, vit higartil hava sæð. Verður støðið tikið í norskum kanningum *(Sintef, 99)*, sæst, at menningarmøguleikarnar eru sera stórir bæði innan fiskiskap, framleiðslu, alivinnu, biotøkni, útgerð og vitan.

## 3.2 Útbúgving og menning

Skulu hesir menningarmøguleikar gagnnýtast, má umfatandi gransking, góðir førleikar og sera dugnaligt arbeiðsfólk til. Tí hevur tað týdning, at útbúgvingarskipanir, vinnan og myndugleikarnir saman, arbeiða við at fáa dugnalig fólk til vinnuna og geva teimum eitt støði við útbúgving, ið er tilætlað vinnuni og teimum tørvum, vinnan hevur í dag og í framtíðini. Nýggjur kunnleiki, menning av tøkni og ymiskir hættir at skipa altjóða handil geva nýggj framtíðarútlit fyri, hvat kann gagnnýtast úr okkara firðum og havumhvørvi.

Føroyar hava nakrir fyrimunir við natúrugivnum tilfeingi, sum til ber at gagnnýta og skapa virði burturúr. Harumframt hava Føroyar eisini eitt tilfeingi at gagnnýta í tí fólki, sum her býr, sum hevur søguligar bindingar, læruumhvørvi og siðaarv at liva av og gagnnýta tað, sum fæst upp úr havinum.

Er vinnan ikki før fyri at fáa fatur á ungum fólki, sum vilja satsa uppá eina yrkisleið innan tey fak og yrki, sum vinnan hevur brúk fyri og fyri at útinna teir møguleikar, ið vinnan hevur, vilja hesir vera standandi sum møguleikar, sum ongantíð vóru framdir í verki.

Um føroysk fiski- og alivinna í framtíðina skal røkka líknandi málum fyri virðisøking, sum m.a. norsk fiski- og alivinna hevur sett sær, er neyðugt at satsa uppá nýggjan granskingargrundaðan kunnleika, soleiðis at teir óbrúktu møguleikarnir fyri búskaparligum vøkstri, sum liggja í tilfeinginum í sjónum verða gagnnýttir. Tað er somuleiðis neyðugt at gera sær klárt, at ein slík virðisøking vil bert koma sum eitt úrslit av útbúgving á hægri stigi. Tørvurin á fólki við hægri útbúgving er í øking, og tilgongd av kønari arbeiðsmegi í fiski og alivinnuni er ein fyritreyt fyri at nýta teir menningarmøguleikar, sum liggja har. Verður hetta gjørt miðvíst vil gongdin verða tann, at aftanfyri hvørt ársverk kemur at liggja eitt hægri framleiðsluvirði enn fyrr.

## 3.3 Ein broytt vinna

Gongdin er tann, at arbeiði, ”sum fólk ikki vilja hava í dag” verður yvirtikið av maskinum. Hetta vil seta hægri krøv til førleikar innan KT, biotøkni, framleiðslugongdir o.l. Krøvini til, at framleiðarar skulu kunna skjalprógva, hvaðani fiskurin kemur, hvussu hann er fiskaður, hvussu hann er hagreiddur og virkaður vilja gerast alt størri og økjandi. Somuleiðis kunnu vit vænta størri krøv til umhvørvi, burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum og reinar vørur.



Yvirlýsingarnar frá Norðurlandaráðnum og ES um heilslufrøðiliga trygga framleiðslu av fiskavørum frá burðardyggum fiskstovnum – “av grunni at munni”-strategi – eru partar av framtíðar karmunum, ið føroyska fiski- og alvinnan má brynja seg til.



Tað er matur, sum vit framleiða, og skjalprógv skulu vera fyri, at virkingin av vørunum er í samljóð við ta fatan, brúkarin hevur av eini góðari og heilsutryggari framleiðslu. Hetta kemur væntandi at merkja, at krøv verða sett teimum, sum virka hesar vørurnar og skulu framleiðarar tí kunnu skjalprógva, at arbeiðsfólkið hevur førleikar at loysa hesa týdningarmiklu uppgávu, tá ið talan er um matvøruframleiðslusertifisering.



Í hesum sambandi verður eisini væntað, at altjóða handilsavtalur fara at seta krøv til, at tey, sum framleiða matvørur, hava førleikar og kunnu skjalprógva hesar. Størri dentur fer at verða lagdur á umhvørvisviðurskiftini og burðardygga gagnnýtslu, eins og á at hava starvsfólk, sum vita, hvat hetta merkir.

Tí er tað týdningarmikið, at partarnir í vinnuni arbeiða saman fyri at gera fiski- og alivinnuna sjónliga sum spennandi vinnu við góðum útbúgvingar- og starvsmøguleikum. Arbeiðsmegi og førleikarnir hjá starvsfólkunum mugu metast sum sera týdningarmiklir spurningar at arbeiða

við, tá tosað verður um møguleikar og karmar fyri størri virðisøking. Virkini mugu tí gera ætlanir fyri, hvussu tey vilja nøkta tørvin á arbeiðsmegi og førleika.

## 3.4 Førleikakrøv

Krøv fara eisini at koma um, at starvsfólkini í vinnuni eru nýskapandi (innovativ), og vinnan má tí duga at draga fólk við hesum eginleikum til sín. Bæði fiski- og alivinnuni tørva útbúgvingar /førleikar viðvíkjandi:

- Leiðslu (eftirútbúgving, virkismenning, gott arbeiðsumhvørvi o.a.)
- Innovatiónsevnum
- Lívfrøðiligum skili
- Kunnleika um góðsku (góðskustýringarskipanir og sertifisering)
- Formellum sertifikatkrøvum til arbeiðsfólk
- Matvøruhandfaring
- KT (menning av útgerð og almennum kunnleika fyri at fáa fulla nyttu og rætta nýtslu)
- Fíggjarligari vitan í øllum liðum
- Matvørutrygd/skjalfesting
- Marknaðarføringskunnleika





# 4. VERANDI ÚTBÚGVINGARVIÐURSKIFTI

## 4.1 Fiskivinnuskúlin í Vestmanna – ein miðnámsskúli

Endamálini við útbúgvingunum á Fiskivinnuskúlanum eru tvinni: 1) at gera tey lesandi før fyri at fara undir framhaldandi og hægri útbúgvingar, og 2) at geva teimum førleikar til at arbeiða á millumleiðarastigi innan fiski- og alivinnuna, sum t.d. deildarleiðari ella góðskuleiðari. Tá fiskivinnuútbúgvingin varð sett á stovn á Fiskivinnuskúlanum í 1989, var høvuðsendamálið at útbúgva fólk til fiskiídnaðin og til alivinnuna, og hetta er framvegis eitt av fremstu endamálunum hjá skúlanum.

Sum er ber til at taka eina 3-ára miðnámsútbúgving innan fiskivinnu á yrkisgymnasialum stigi (stytt HIF) á Fiskivinnuskúlanum. At ein útbúgving er yrkisgymnasial merkir, at hon gevur atgongd til hægri útbúgvingar, umframt arbeiðsførleika. Burtursæð frá teimum vinnurættaðu lærugreinunum, eru allar lærugreinir býttar í C, B og A-stig, har A-stigið er hægsta stigið. Fyri at standa HIF-prógv skulu næmingarnir, eins og á øðrum gymnasialum útbúgvingum, taka eitt nærri ásett tal av lærugreinum á A-stigi.

Støðisárið – stytt SIF – er skipað við einum yrkisblokki, umframt at undirvíst verður í 6 almennum lærugreinum á C-stigi. Farið verður til 6 próvtøkur í endanum av hesum árinum, og næmingarnir fáa skúlaprógv. Tey, sum velja HIF-útbúgvingina, ganga tvey ár á skúlanum afturat støðisárinum. 2. og 3. árið er undirvísingin skipað sum vanlig skúlagongd við ástøðiligum lærugreinum. Harumframt arbeiða næmingarnir triðja árið í 350 tímar við eini sjálvvaldari verkætlan, sum teir kunnu velja eftir áhuga og ætlanum fyri framtíðini.







*Yvirlit yvir lærugreinirnar í SIF- og HIF-útbúgvingunum:*

| **Lærugrein** | **Tímatal og stig SIF** | **Tímatal og stig 1. HIF** | **Tímatal og stig 2. HIF** |
|---|---|---|---|
| *Kravdar lærugreinir* | | | |
| Alis-/evnafrøði | 140 (C) | | |
| Enskt | 140 (C) | 140 (B) | |
| Evnafrøði | | 175 (B) | |
| Fiskivinna | | | 140 (B) |
| Føroyskt | 140 (C) | 140 | 140 (A) |
| Fyriskipan | | | 140 (A) |
| KT | | 140 (B) | |
| Lívfrøði | 105 (C) | | |
| Marknaðarførsla | | | 140 (B) |
| Matvørulæra | | | 210 (A) |
| Matvøruframleiðslutøkni | | 140 (B) | |
| Samfelagsfrøði | 105 (C) | | |
| Smáverulívfrøði | | 140 (B) | |
| Støddfrøði | 175 (C) | | |
| Týskt | | | 140 (C) |
| Verkætlan | | | 350 (A) |
| Virkisbúskapur | | 210 (B) | |
| Yrkisástøði og starvsvenjing | 560 | | |
| ***Vallærugrein*** | | | |
| Støddfrøði | | 175 (B) | |

HIF gevur teimum, sum ætla sær at lesa víðari, atgongd til hægri lestur. Ein kanning sum næmingar á Fiskivinnuskúlanum gjørdu í 2000 av, hvat tey, sum hava tikið prógv á skúlanum takast við í dag, er lýst í niðanfyristandandi talvu.

| **Tal av spurdum næmingum: 90** | **Menn: 53** | **Kvinnur:37** | **Menn: %** | **Kvinnur: %** |
|---|---|---|---|---|
| Einki starv fyri tíðina | 5 | 7 | 9,4 | 18,9 |
| Vanligt starv innan fiskivinnuna | 12 | 6 | 22,6 | 16,2 |
| Leiðandi starv innan fiskivinnuna | 17 | 10 | 32,1 | 27 |
| Leiðandi starv – ikki innan fiskivinnuna | 3 | 1 | 5,7 | 2,7 |
| Víðari lestur | 5 | 3 | 9,4 | 8,1 |
| Onnur størv | 11 | 10 | 20,8 | 27 |

*Kelda: Fiskivinnuskúlin*

## 4.2 Útbúgvingar á Fiskivinnuskúlanum í framtíðini

Ynski hava javnan verið frammi um, at Fiskivinnuskúlin eisini skal bjóða skeið og eftirútbúgving til lidnar næmingar, umframt førleikagevandi skeið til arbeiðsfólk í fiski-og alivinnuni, sum í mest møguligan mun stuðla undir tann tørv, sum vinnan hevur á slíkum. Hetta ger skúlin í ávísan mun í dag, men vinnan tykist at sakna ein yvirskipaðan málsetning fyri hesi førleikagevandi skeið. Ein slíkur málsetningur eigur at verða orðaður í samstarvi millum skúla, myndugleikarnar og vinnuna.

Sum talvan omanfyri vísir, eru fáir næmingar frá Fiskivinnuskúlanum farnir undir hægri lestur. Orsøkirnar til hetta kunnu vera fleiri, m.a. at møguleikarnir at fáa eitt arbeiði í vinnuni er góðir, og at nóg stórur dentur kanska ikki verður lagdur á týdningin av at taka hægri útbúgvingar innan hetta virkisøki. Í framtíðini eigur dentur at verða lagdur á týdningin, tað hevur fyri menningina av fiski- og alivinnuni, at fólk taka framhaldandi útbúgvingar innan økið.

Somuleiðis ynskir fiski- og alivinnan, at lærlingaútbúgvingar verða settar á stovn, soleiðis at fiskavirkir, alistøðir og smoltstøðir í framtíðini kunnu seta lærlingar á jøvnum føti við handverkaravinnuna. Ein arbeiðsbólkur, sum Yrkisútbúgvingarráðið setti 6. september 2000, hevur gjørt eitt tilmæli til Yrkisútbúgvingarráðið um hetta. Høvuðstættirnir í arbeiðinum vóru at gera 1) ein yvirskipaðan málsetning fyri lærlingaútbúgvingina, 2) eina meting um virki, sum kunnu hava lærlingar, 3) eina meting av, hvussu útbúgvingin kann skipast, her í millum býtið millum verkliga læru og skúlagongd. Í samráð við avvarðandi feløg á økinum, kom arbeiðsbólkurin fram til hesi tilmæli til yrkisútbúgvingarráðið:



1. útbúgving innan fiskiídnað og havbúnað verður sett á stovn í Føroyum sum ein 3-ára yrkisútbúgving,
2. útbúgvingin verður skipað við tveimum breytum - einari til lærlingar á flaka- og kryvjivirkjum (”fiskavirkari”) og einari til lærlingar á smolt- og alistøðum (”fiskarøktari”),



3. skúlagongdin í útbúgvingini fer fram á Fiskivinnuskúlanum, sum frammanundan hevur fiskivinnuútbúgvingar, og sum lærlinga-útbúgvingin partvíst kann samskipast við,
4. fyrsta árið í útbúgvingini er eitt støðisár. Annað árið er upplæring á læruplássinum. Triðja árið er partvís upplæring á læruplássinum, og partvís skúlagongd í 12 vikur, har yrkisroyndin fer fram. Hesar 12 vikurnar kunnu býtast í 2 styttri skúlaskeið,



5. viðkomandi yrkisnevnd samtykkir innihaldið í yrkislærugreinunum og fakligu grundlærugreinunum, og hvørjar hesar skulu vera. Skúlin ger í samráð við yrkisnevndina av, hvørjar tær almennu grundlærugreinirnar á C-stigi skulu vera,



6. útbúgvingin verður skipað soleiðis, at lærlingarnir eisini fáa lestrarførleika til víðari/framhaldandi útbúgvingar,
7. fólk, sum hava verið í vinnu innan fiskiídnað og havbúnað, kunnu fáa stytting í lærutíðini,
8. krøv verða sett læruplássunum, soleiðis at lærlingum verður tryggjað eina læru, sum gevur góðar førleikar til at kunna taka ábyrgd av einum virkisøki á virkjunum,
9. seta arbeiðsbólk við umboðum fyri vinnu, skúla og avvarðandi myndugleikum at útgreina innihaldið í útbúgvingunum, t.v.s. at tilevna eina útbúgvingarkunngerð, og at
10. skipanin verður sett í verk 1. januar 2002.

Yrkisútbúgvingarráðið hevur sett ein arbeiðsbólk at arbeiða víðari við at útgreina innihaldið í útbúgvingunum, t.v.s. at tilevna eina útbúgvingarkunngerð til yrkisútbúgvingarnar innan fiskiídnað og havbúnað.

## 4.3 Fróðskaparsetrið – Náttúruvísindadeildin

Náttúruvísindadeildin kann bjóða førleikagevandi BS-útbúgvingar (Bachelor of Science), ið tilsamans taka 3 ella 3 1/2 ár. Hetta eru útbúgvingar innan lívfrøði, teldufrøði, ravmagnsverkfrøði, oljuverkfrøði og alis-jarðalisfrøði. Fakliga støðið er fult á hædd við tilsvarandi útbúgvingar á universitetum í útlondum, og tí eru eisini góðir møguleikar fyri at útbúgva seg víðari uttanlands, um ein ynskir tað eftir lokna útbúgving á Fróðskaparsetrinum. Allar BS-útbúgvingarnar enda við eini verkætlan, sum studentarnir hava umleið 16 vikur til at gera, og hesar kunnu í fleiri førum gerast saman við vinnuni. Niðanfyri er stutt útgreining av trimum útbúgvingum, sum eru viðkomandi í sambandi við fiskivinnuna. Nágreiniligt yvirlit yvir skipan og innihald í útbúgvingunum fæst á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum.

**BS-útbúgvingin í lívfrøði** tekur 3 ár. Fyrri partur er tvey ára støðisútbúgving í lív-/evnafrøði. Í støðispartinum verður umframt í lívfrøðislærugreinum eisini undirvíst í evnafrøði, lívevnafrøði, støddfrøði, hagfrøði og teldunýtslu. Seinni partur er ein eitt ára serlestur, har dentur verður lagdur á havlívfrøði, fiskalívfrøði, havfrøði, eiturvistfrøði og dálking. Eitt minni skeið er eisini um aling. Evni til BS-verkætlan eru t.d. innan almenna havlívfrøði, ávirkan av dálking á lívið í havinum, umhvørvisspurningar og evni í samband við alivinnu. Útbúgvingin miðar m.a. móti leiðandi størvum innan fiskivinnu, aling, umhvørvisumsiting og størvum sum granskingarhjálparar. BS í lívfrøði er endalig útbúgving, men tey flestu halda tó ofta beinleiðis fram við lestrinum til hægri stig á universitetum í útheiminum, eitt nú í Danmark, Norra og Bretlandi.

**BS-útbúgvingin í teldufrøði** tekur tilsamans 3 ár, har fyrstu tvey árini í ávísan mun eru felags við støðisútbúgvingina innan stødd-/alisfrøði. Seinni 1 ára parturin fevnir um sergreinir innan forritamál, dátugrunnar, stýrikervi og kervismenning. Umframt hetta verður arbeitt við eini høvuðsuppgávu. Stóra menningin innan kunningartøkni hevur økt munandi um tørvin á útbúnum fólki á hesum øki seinastu árini. Fólk við hesi útbúgving eru væl skikkað til ráðlegging og forriting av skipanum, sum krevja innlit í tøkniskipanir (t.d. til logging, stýring og automatisering).

**BS-útbúgving í ravmagnsverkfrøði** er ein 3 1/2 ára verkfrøðingaútbúgving. Samanborið við danskar útbúgvingar er hetta ein diplomverkfrøðingaútbúgving. Fyrstu 2 árini er felags við stødd-/alisfrøðiligu støðisútbúgvingina, meðan seinastu 1 1/2 árini innihalda sergreinir í ravmagnsverkfrøðiligum evnum. Í útbúgvingini ber til at tilevna sergreinar og BS-verkætlan soleiðis, at tær laga seg eftir viðkomandi arbeiðsuppgávum í landinum. BS-verkætlanirnar verða ofta gjørdar í samstarvi við vinnuna. Nevnast kunnu verkætlanir um stýritøkni í fiskiídnaðinum og um tráðleysa stýring av fóðurmaskinum hjá alivinnuni.

## 4.4 Útbúgvingar á Setrinum í framtíðini

Omanfyri nevndu útbúgvingar kunnu takast í Føroyum, og er tað umráðandi, at tær m.a. kunnu rótfestast í føroyskari vinnu, soleiðis at tey lesandi í lestrartíðini fáa áhuga fyri og síggja møguleikarnir í vinnuni og soleiðis fáa áhuga fyri at brúka síni evni har eftir lokna útbúgving.



Tað má metast at vera skilagott, at vit her í Føroyum fara at bjóða okkum fram við eini BS-útbúgving innan matvørufrøði, og somuleiðis bjóða eftirútbúgvingar og ymisk skeið á hesum øki, soleiðis at førleikastøðið á økinum sum heild hækkar í Føroyum. Eitt samskifti eigur at fáast í lag um hetta millum m.a. vinnuna og Fróðskaparsetrið, soleiðis sum útbúgvingarpolitikkálitið hevur mælt til í parti 7.1.18, har víst verður á týdningin av at byggja upp álit og samstarv millum útbúgvingarstovnar og vinnulív. Við hesum verður tryggjað, at sameining er millum gransking, undirvísing og vinnulív.



Harumframt hevði tað verið hóskandi, at eitt ávíst rekrutteringsarbeiði varð gjørt á Fróðskaparsetrinum og á Fiskivinnuskúlanum, fyri at vísa næmingunum á Fiskivinnuskúlanum á møguleikarnar innan víðari lestur í Føroyum.



## 4.5 Støðan hjá ali- og fiskivinnuni í dag

Høvuðsvirkisøkini innan fiski- og alivinnuna eru veiða, virking, søla og framleiðsla av alifiski. Ein meting, ið er gjørd av útbúgvingarstøðinum hjá leiðslunum innan virkisøkini í fiskivinnuni og samlaða talinum á arbeiðsfólki í vinnuni vísir, at føroyska fiski- og alivinnan eru vinnur, har fá fólk við hægri útbúgving arbeiða. Hetta kemst m.a. av, at talan í stóran mun er um familjufyritøkur ella fyritøkur, sum verða stýrdar av íverksetara. Eitt av eyðkennunum við hesum fyritøkunum er m.a., at leiðslan ofta er myndað av teimum, sum eiga ella hava sett fyritøkuna í gongd og ikki neyðturviliga av fólki, sum er sett í starv vegna teirra fakliga førleika.

Verður hugt eftir talinum á arbeiðsfólki í fiski- og alivinnuni sæst, at innan fiskiveiðu og fiskavirking er talið á fólki í minking, meðan talið í alivinnuni er vaksandi. Munurin millum fiskivinnuna og alivinnuna er sjálvsagdur, um hugt verður eftir øktu framleiðsluni í alivinnuni.




*Løntakarastørv í fiski- og alivinnuni frá 1985-2000*

Sum myndin omanfyri vísir, er talið á starvsfólki í fiskivinnuni í minking. Gongdin í talinum á arbeiðsfólki í høvuðsvinnuni í Føroyum er tann sama, sum gongdin í teimum londum, vit vanliga samanlíkna okkum við. Orsøkin er fyrst og fremst, at arbeiðsuppgávurnar umborð á skipum, á virkjum og alistøðum gerast alt meira sjálvvirknar, soleiðis at tørvurin á arbeiðsfólki minkar. Fyri tann partin av arbeiðsfólkinum, sum er eftir í vinnunum, er tørvurin broyttur á tann hátt, at tørvur er á fólki við útbúgving, m.a. tí sjálvvirknu arbeiðsgongdirnar skulu yvirvakast, og at krøvini frá keyparum eru munandi herd seinnu árini.

Vøru- og tøknuliga menningin, sum er hend, ger, at krøvini til førleikarnar hjá arbeiðsfólki alsamt broytast og økjast. Hetta skapar ein stóran tørv á arbeiðsfólki og ábyrgdarfólki við fakligum og persónligum førleikum, sum gera tey før fyri at taka ábyrgd fyri sínum arbeiði í samsvari við tey krøv, sum keyparar og heilsumyndugleikar seta.

## 4.6 Rekrutterings-spurningurin

Soleiðis sum støðan er í dag, er mangan torført hjá føroyskum virkjum í fiski- og alivinnuni at manna størv, har neyðugt er við fólki við hægri útbúgvingum, tvs. á kandidatstigi. Hvør orsøkin er, er ilt at meta um, men eftir øllum at døma vil henda støða ikki gerast frægari sum frá líður. Um ikki so langa tíð kemur fiski- og alivinnan ikki bert at kappast sínámillum og við tað almenna um bestu starvsfólkini, men eisini við eina komandi oljuvinnu.

Vinnan er varug við avbjóðingarnar, sum førleika- og rekrutterings-spurningurin hevur við sær, og arbeiðir miðvíst við at betra um arbeiðs-umstøðurnar í vinnuni innan arbeiðsumhvørvið og við at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at virksemið er javnt yvir árið.

Ein annar partur av hesum er ásannanin av, at okkurt má gerast fyri at gera fiski- og alivinnuna meira lokkandi fyri tey, sum taka hægi útbúgvingar, tøkniliga útbúgvingar og annars øll starvsfólk, sum arbeiða og kunnu arbeiða í vinnuni. Hetta ger vinnan við at vísa á, at neyðugt er við førleikamennandi tiltøkum innan fiski- og alivinnuna, og samstundis ásanna, at hon sjálv má gera meira við at vísa á møguleikarnir har.

Fiskiídnaðurin er í løtuni saman við Granskingardeplinum fyri Økis-menning í gongd við eina verkætlan, har hugt verður eftir, hvørji viður-skifti eru avgerðandi fyri, hvørja yrkissleið ungdómurin velur, hví tey ikki útbúgva seg við støði í okkara høvuðsvinnu og hvørji viðurskifti innan fiskivinnuna, sum møguliga styggja tey burtur.

Ein onnur verkætlan, sum fer í gongd í næstum, hevur til endamáls at kanna eftir, hvørji viðurskifti gera, at arbeiðsmegin í fiskivinnuni sýnist óstøðug.

Tá verkætlanirnar eru lidnar komandi ár, er ætlanin at arbeiða miðvíst - út frá úrslitunum av verkætlanunum - við teimum viðurskiftum, sum ávirka valið, ið ungdómurin tekur og tey viðurskifti, ið ávirka arbeiðsmegina í vinnuni.

Vinnan arbeiðir eisini saman við Mentamálastýrinum við eini verkætlan, har dentur verður lagdur á at vísa børnunum og ungdóminum í fólkaskúlanum, hvat okkara høvuðsvinna hevur at bjóða. Miðvíst arbeiði innan fólkaskúlan vil stuðla upp undir, at børnini fáa kunnleika til vinnuna, umframt at tey sleppa at royna seg har, tá høvi er til tað. Hetta arbeiði fer at geva føroysku fiskivinnuni møguleika at menna seg í einum samfelagi, har hvørt mansbarn hevur ávísan kunnleika til vinnuna og tí betri fatan av, hvørji viðurskifti hava týdning fyri hana.



Framhaldandi útbúgving í minsta lagi á miðnámsstøði er gerandisdagur fyri stóran part av føroyska ungdóminum. Fyri ikki at missa ungdómin til onnur yrki og vinnur má arbeiðast við at rekruttera tey til viðkomandi vinnulig fak á miðnámsskúla. Har frá má arbeiðast við at fáa hesi at velja at arbeiða í vinnuni, at taka hægri útbúgving og seinni eina yrkisleið innan fiski- og alivinnuna og tænastuvinnurnar, sum hava tilknýti til vinnunar, t.d. flutningsfeløg, veitarar av útgerð og hjálpitilfari, umframt tænastur annars.





Á Fiskivinnuskúlanum er møguleiki at fáa miðnámsútbúgving innan fiskivinnu. Henda útbúgvingin, sum í síni tíð varð misjavnt móttikin, eisini av vinnuni, hevur nú fingið sín natúrliga leiklut í okkara vinnu, við at fólk útbúgvin haðani arbeiða í fiski- og alivinnuni, umframt at skúlin bjóðar skeið til fiski- og alivinnuna og skipar fyri ymsum tiltøkum av vinnuligum áhuga. Hesi útbúgvingartilboð á Fiskivinnuskúlanum eiga at økjast so hvørt sum vinnan mennist við styttri og longri útbúgvingum, umframt skeiðum.

Sum myndin niðanfyri vísir, hevur fíggjarliga gongdin í føroysku fiski- og alivinnuni verið góð seinnu árini. Lønsemið í vinnugreinunum er alsamt økjandi og kappingarførið hjá føroyskum framleiðarum og útflytarum hevur verið gott. Skal hesin framburður halda fram, er neyðugt at stremba eftir eini førleikauppbygging í vinnugreinunum í Føroyum, ið á jøvnum føti við ta, kappingarneytar okkara í Noregi og í Íslandi útinna.



Føroyar hava stór tilfeingi í havinum og firðunum runt oyggjarnar. Hesi tilfeingi mugu vit læra at gagnnýta best møguligt, nú føroyska fiski- og alivinnan er inni í einari spennandi menning. Fiski- og alivinnan hevur seinastu 5 árini tillagað seg nýggj viðurskifti og klárað avbjóðingar í kringumstøðunum, har umskiftið í veiðuni, framleiðslu og harvið í rávørutilgongdini hevur verið stórt.




*Kelda: Ársfrágreiðing Føroya Ráfiskakeyparafelags*

Sjálvt um broytingarnar bæði í lívfrøðiligum, fíggjarligum og handilsligum viðurskiftum hjá vinnuni hava verið stórar, hava úrslitini seinnu árini verið alsamt betri.



# 5. HVAT KANN GERAST Í FØROYUM ?

## 5.1 Alment

Í álitinum, sum Útbúgvingarpolitikknevndin legði fram í 1999, verður m.a sagt í bind 1, s.76: "Í teimum londum, vit vanliga sammeta okkum við, tykist eingin ivi vera um, at ein miðvís ætlan fyri útbúgving, menning og gransking er týdningarmesta grundarlagið fyri menningina av vinnulívinum. Stjórnir, sum fyrr røktu menningarpolitikk við beinleiðis stuðli ella tílíkum, seta sær í dag fyri at skapa karmar, sum fremja menning og nýskapan í vinnulívinum". Í sama áliti er mynd, ið lýsir nýskapanargongdina og um sjálva nýskaparnartilgongdina stendur á síðu 74 í bind 1: "Á granskingarstovnum og undirvísingarstovnum finst vitan, sum byggir á vísindaligt arbeiði. Í vinnulívinum finst handilsvitan og kapitalur. Spurningurin er, hvussu vit binda hesar báðar partar saman. Hvussu sláa vit brúgv um gjónna millum vísindi og vinnulív?"

Myndin niðanfyri lýsir gjónna millum vinnulív øðrumegin og undirvísingarlív hinumegin. Myndin er upprunaliga gjørd í Íslandi, men hóskar eins væl til føroysk viðurskifti. Eitt aðalmál fyri bæði almennu Føroyar og vinnulívið má vera at minka um gjónna, fyri at fáa nýskapan inn í tað føroyska samfelagið. Ein háttur at minka um gjónna kundi verið at fingið betur samskifti millum vinnulív, útbúgving og gransking.

Her verður serliga hugsað um at læra vinnuna, at vinnan kann njóta gott av einum virknum granskingar- og menningarumhvørvi. Í álitinum frá Útbúgvingarpolitikknevndini, bind 1, s. 75, verður m.a. sagt, at gransking og vinna eru mótleikarar (sparring partners) og samskifta í sama umhvørvi. Slík umhvørvi geva samstarvsfyrimunir (synergi) og møguleika fyri eykaframleiðslu (spin-off) í mun til verandi fyritøkur.



## 5.2 Samstarv millum vinnu og gransking

Verður hugt eftir føroysku granskingarumhvørvunum, er siðvenjan fyri samstarvi millum vinnuna og granskingarumhvørvið avmarkað. Somuleiðis er vinnan ikki von við at brúka tey granskingarumhvørvi, sum eru.

Eitt aðalmál um, at partarnir mugu síggja viðurskiftini í einum breiðari høpi og finna gongdar leiðir í felag, og soleiðis líðandi minka um gjónna, eigur at verða sett. Ein gongd leið í hesum høpi kann vera at læra vinnuna at brúka eina fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð sum eitt amboð til at loysa trupulleikar og sum eitt amboð í nýskapanartilgongdini. Í Føroyum eru vit ikki von við, at skúlin ella granskingarumhvørvið verða brúkt sum amboð til at loysa trupulleikar, sum vinnan hevur, heldur er tað soleiðis, at umsitingin setur spurningarnar, sum skúlin og granskingarumhvørvið svara. Í londunum rundan um okkum hevur í longri tíð verið vanligt at hava lutvíst ella fult alment fíggjaðar starvsstovur og granskingarumhvørvi, sum vinnan kann nýta sum amboð til at loysa trupulleikar, eins og til nýskapan.







# 6. FELAGS STOVNUR Í MIÐØKINUM

## 6.1 Alment

Nøkur starvsøki, sum bæði vinnan og granskingarumhvørvini hava tørv á, kundu verið løgd á eina fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð, sum hevur til endamáls at fáa vinnu og gransking at møtast. Hetta kundi verið gjørt við einum útbygdum Fiskivinnuskúla sum týðandi partur av miðstøðini. Hugsanin við hesum er ikki, at virksemi ella partar av virkseminum á verandi stovnum skulu flytast til miðstøðina, men heldur at miðstøðin skal nøkta tann tørv, ið verandi stovnar og vinna sum er ikki fáa nøktað.

Staðseting av tænastuvirksemi til vinnuna í einum undirvísingar-og menningarumhvørvi knýtir natúrligu viðskiftafólkini, tvs. vinnuna, nærri at hesum umhvørvinum.

## 6.2 Útbúgving og tænastuvirksemi

Fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøðin skal í framtíðini verða við til at menna teir førleikar, ið vinnan sum heild hevur tørv á. Við eini nútímansgjørdari fiskivinnuútbúgving á miðnámssstøði, kundi miðstøðin veitt veiðu- og framleiðsluliðnum, umframt alivinnuni, møguleikar fyri eftirútbúgving og skeiðum, hóskandi til starvsfólk í vinnuni, á ymiskum førleikastigum. Á henda hátt hevði vinnan og arbeiðsfólkið í vinnuni fingið kunnleika til og møguleika til at identifisera seg við miðstøðina og tað virksemi, sum annars fer fram har. Miðstøðin skal eisini menna undirvísingartilfar til forløgini, sum geva út tilfar til fólka- og miðnámsskúlan í Føroyum og veita tilfar til útgávu, grundað á tey úrslit, sum føroyskir granskingarstovnar fáa til vega í granskingarverkætlanum.

Harafturat kann miðstøðin fevna um eina kanningarstovu afturat teimum, sum eru á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, men sum ikki er bundin at eftirlitsuppgávum yvirhøvur. Hyggja vit eftir londunum rundan um okkum, hava tey øll meira enn eina almenna starvsstovu, og í øllum førum eina alment fíggjaða starvsstovu, sum ongar eftirlitsuppgávur hevur. Í tí høpi er skilagott at umhugsa, um ein evt. nýggj kanningarstova kann vera løgd saman við eini fiskivinnumiðstøð, soleiðis at bæði undirvísingarverkið og vinnan kunnu brúka hesa kanningarstovuna til at nøkta sín tørv. Hetta er lýst nærri í fylgiskjali D.

Tænastuvirksemi í eini royndarhøll og teimum mest vanligu starvsstovukanningunum til fiski- og alivinnuna, hevði verið við til at fingið leiðslurnar í fiskivinnu- og alifyritøkunum inn í umhvørvið á miðstøðini.

BS-útbúgving innan matvørufrøði (sí fylgiskjal C) eigur at verða staðsett á Setrinum saman við BS-útbúgvingum innan KT og lívfrøði. Verkætlanarparturin av hesi útbúgvingini kundi hóskandi ligið á fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøðini, har møguleikar eru at gera praktiskar royndir,

sum eru partar av verkætlanum á kanningarstovu og royndarhøll. Lagt verður eisini upp til, at onnur, sum arbeiða við verkætlanum, t.d.høvuðsuppgávum, Ph.D.-ritgerðum o.l., í Føroyum ella uttanlands, skulu kunnu sita part av tíðini á miðstøðini og arbeiða.

Yvirskipaða endamálið skal vera at geva menningarverkætlanum, undirvísing og vinnuni karmar, har tey kunnu ganga fram í felag. Skal slíkt virksemi koma størsta partinum av landinum til góða, eigur ein slík miðstøð at liggja soleiðis fyri, at hon er lætt atkomandi hjá so nógvum brúkarum, sum til ber.

## 6.3 Fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøðin – fortreytir

Tað man neyvan vera nakar ivi um, at sjálv staðsetingin av eini fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð, sum verandi Fiskivinnuskúli verður ein partur av, hevur stóran týdning fyri, hvør undirtøkan verður manna millum. Tí eigur miðstøðin at verða løgd soleiðis, at hon liggur miðskeiðis í landinum og samstundis væl fyri í mun til økið, har tað nógva virksemið innan fiski- og alivinnuna er savnað. Serliga tá hugsað verður um alivinnuna er hetta týdningarmikið, tí eingin siðvenja er fyri útbúgvingum í Føroyum, sum burturav venda sær til hesa vinnu, meðan sjómansskúlarnir og Fiskivinnuskúlin gjøgnum árini hava bjóðað útbúgvingar til ávíkavist veiðuliðið og fiskiídnaðin.



**1)** Staðseting av miðstøðini miðskeiðis í landinum er týdningarmikil, við tað at talan verður um ein stovn, ið er einsamallur á sínum virkisøki, og skal tí veita tænastur til alt landið. Tí ræður um at leggja miðstøðina soleiðis, at stóra fleirtalið av fólkinum í landinum kann koma til miðstøðina, til útbúgvingar-, skeið-, og tænastuvirksemið har, so ómakaleyst, sum til ber, innanfyri uml. hálvan tíma. Komandi undirsjóvartunnlar til Vágoynna og til Norðuroyggjarnar fara at styrkja um hesa staðseting. Ein staðseting uttanfyri hetta øki hevði hin vegin havt við sær, at tey flestu skulu ferðast óneyðuga langa tíð fyri at koma til miðstøðina.



Miðstøðin eigur at kunna samstarva um lærarar við teir ymsu miðnámsskúlarnar í miðøkinum, ið hava neyðuga førleikan at undirvísa í einum stórum parti av teimum lærugreinum, sum finnast í útbúgvingartilboðum Fiskivinnuskúlans.



Ein ávísur vandi kann tó vera í at leggja eina fiskivinnuútbúgving ov tætt øðrum miðnámsútbúgvingum, soleiðis at skilja, at hon lættliga kann hvørva burtur ímillum hinar útbúgvingarnar og missa síni sereyðkenni.

Møguliga kann miðstøðin leggjast í tilknýti til virkisbygningar, sum

kundu verið hóskiligir til royndarhøli.

Ein natúrligur háttur at fáa alivinnuna við í úbúgving og menning er at leggja miðstøðina í nánd av, har vinnan er miðsavnað.

Hugsað eigur at verða um næmingabústaðir í sambandi við staðsetingina. Mett verður, at ein búdeild eigur at verða knýtt at miðstøðini.



**2)** Tað verður eisini mett sum sera umráðandi, at miðstøðin hevur dagligt samband við ymsa vinnu í nærumhvørvinum og á tann hátt fær nýggjastu rákini inn til sín, eins og virkini njóta gott av tí virksemi, sum fer fram á miðstøðini, tað veri seg undirvísing, tænastur og menningarverkætlanir.



Fiskiídnaðurin og havbúnaðurin eigur tí at vera so fjøltáttaður í økinum sum møguligt, og kunna samstarva við skúlan til dagliga um verkligar tættir í útbúgvingini.



**3)** Við tað at talan er um eina miðstøð, ið er sett saman av fleiri eindum, eigur at bera til at raðfesta eindirnar og byggja tær út yvir eitt ávíst áramál.

Ein hornasteinur á miðstøðini verður Fiskivinnuskúlin, sum síðan hann var settur á stovn hevur havt tørv á betri hølisumstøðum. Hetta eigur at verða gjørt sum skjótast. Menningar- og kunningarvirksemið, sum eisini skal verða knýtt at miðstøðini, verður bygt út so hvørt.

**4)** Skeið til vinnuna eiga í mestan mun at verða hugsað saman við miðstøðini. Hon eigur tí at hava eina umsiting, ið hevur orku at taka sær av hesum skeiðum og samstarva við aðrar útbúgvingarstovnar, sum eisini halda skeið fyri starvsfólk í fiski- og alivinnuni.

Skeiðsvirksemið fer óivað eisini at krevja, at miðstøðin hevur samband við útlendskar veitarar av serskeiðum, og tí mugu neyðugar avtalur gerast við slíkar veitarar.

## 6.4 Annað sum dregur

Nakað, sum avgjørt er vert at hava í huga, tá tosað verður um staðseting av miðstøðini við tilhoyrandi fiskivinnuskúla, er, at staðsetingin kann hava stóran týdning fyri, um ungdómurin velur at fara á Fiskivinnuskúlan ella á annan miðnámsskúla. Tilboðini til næmingarnar eftir loknan skúladag, her í millum bústaðarmøguleikar, góðir flutningsmøguleikar til og frá skúla, umframt at kunna vera saman við vinfólkum og øðrum ungum,



eru viðurskifti, sum hava sera stóran týdning fyri tey, ið velja sær miðnámsútbúgving. Undir øllum umstøðum er neyðugt at hava bústaðar- og flutningsmøguleikarnar hjá næmingum og skeiðsluttakarum í geyma, tá ið miðstøðin verður sett á landkortið.

Tað tykist sum heild - í Føroyum eins og í londunum rundan um okkum - at vera sera torført at rekruttera ungdóm til fiskivinnuligar útbúgvingar, bæði á miðnámsstøði og hægri støði. Hví hetta er so, er í sær sjálvum ein umfatandi spurningur, men verður skúlin lagdur í einum øki, sum er lítið lokkandi fyri tey, sum standa fyri at velja sær útbúgving, so er vandi fyri, at hetta fer at avmarka tilgongdina enn meira enn frammanundan.







# 7. TILMÆLI FRÁ NEVNDINI

Nevndin mælir til, at fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð verður sett á stovn í miðøkinum.

## 7.1 Innihald

Henda miðstøð skal fevna um útbúgvingar á gymnasialum stigi, eins og yrkisútbúgvingar, og harafturat samstarva við vinnuna á handilsligum grundarlagi í sambandi við tænastur og skeið, sum miðstøðin bjóðar. Hon skal hava kanningarstovu og royndarhøli, og annars arbeiða innan tey trý virkisøkini: undirvísing, kanningar fyri vinnuna, og menningarverkætlanir, ið m.a. framhaldandi skulu menna fiski- og alivinnuna.

Miðstøðin skal framleiða undirvísingar- og kunningartilfar, ið er grundað á innsavnaðar upplýsingar og úrslit av tí arbeiði, sum fer fram á henni, umframt at hjálpa til við útgávu av granskingarúrslitum í altjóða tíðarritum.

## 7.2 Rekruttering

Samstarvið millum miðstøðina og vinnuna í sambandi við tænastuvirksemi, skeiðsvirksemi og menningarverkætlanir skal vera støði undir rekrutteringini av fólki frá fiski- og alivinnuni inn í miðstøðina og av útbúnum fólki til hesar vinnur. Somuleiðis skal málrættað marknaðarføring av fiski- og alivinnuni, sum spennandi vinnur við stórum avbjóðingum og framtíðarmøguleikum, verða ein partur av upplýsandi virkseminum hjá miðstøðini.

## 7.3 Skipan av miðstøðini

Fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøðin eigur at verða skipað sum sjálvsognarstovnur, har verandi stovnar innan undirvísing, gransking og menning innan økið, eins og vinnan er umboðað í stýrinum. Við hesum verður tryggjað, at áhugamálini hjá øllum pørtum eru við í virkseminum á miðstøðini, og at nýggir tættir verða lagdir afturat tí, sum longu verður gjørt. Høvuðsmálið má vera at styrkja felags áhugamálini hjá øllum teimum stovnum og fyritøkum, ið luttaka í menningini av fiski- og alivinnuni í síni heild.

Miðstøðin eigur at fevna um **tríggjar eindir**:

1) Eina **útbúgvingareind**, ið fevnir um verandi Fiskivinnuskúlan við styttri og longri útbúgvingum á miðnámsstøði, yrkisútbúgvingum, umframt eftirútbúgving og førleikagevandi skeiðum á ymsum stigum.

2) Eina **menningareind** við kanningarstovu, royndarhøll og við um-

støðum fyri verkætlanum, ið fara fram í samstarvi við hægri útbúgvingarstovnar og vinnuna og skeið á hægri stigi. Aktuellar tørvsmetingar eiga at verða gjørdar, áðrenn íløgur verða gjørdar í hesum høpi.

3) Eina **kunningareind**, har undirvísingartilfar verður framleitt í samstarvi við ymisk forløg, og sum eisini hjálpir til tá føroyingar útgeva kanningarúrslit í altjóða tíðarritum. Altjóða tilfar skal tillagast, soleiðis at so nógv sum møguligt kunnu gagnnýta tilfarið. Deildin skal eisini taka sær av marknaðarføring av fiski- og alivinnuni sum spennandi vinnur at arbeiða í. Við hesi deild verður brotið upp úr nýggjum, og tí má serlig orka leggjast í at skipa hesa deild.

Ein stjóri verður settur at samskipa virksemið á deplinum út frá teimum leiðreglum, ið stýrið fyri miðstøðina ásetir.

## 7.4. Stýrið

Nevndin mælir til, at stýrið verður sett saman av umboðum fyri viðkomandi partar innan fiskivinnuna og havbúnaðin. Hugsað verður um avvarðandi løntakarar og arbeiðsgevarar, stovnar sum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Fróðskaparsetrið, umframt feløg innan ávís yrkisøki í fiski- og alivinnuni. Stýrið eigur at hava neyðugar heimildir eins og ta ábyrgd, ið stýri fyri sjálvsognarstovnar vanliga hava.

## 7.5 Eftirútbúgvingarskeið

Nevndin metir tað vera átrokandi, at eftirútbúgvingarskeið til fólk, ið starvast í fiski-og alivinnuni byrja sum skjótast. Farið kann vera undir hesi skeið, longu áðrenn ein miðstøð er bygd, og mælt verður til, at almennur stuðul verður latin sambært myndli á s. 51.

Í fyrstu syftu ber til at umsita hesi skeið innan miðfyrisitingina, soleiðis sum víst verður á í fylgiskjali A. Samstundis eigur støða at verða tikin til, hvørja uppgávu teir ymsu útbúgvingarstovnarnir hava í hesum sambandi, og hvør kostnaðurin verður. Harafturat má greiða fáast á, hvat avtalu- og regluverk er neyðugt, fyri at ein eftirútbúgvingarskipan fyri øll starvsfólk í fiski- og alivinnuni kann fáast upp at standa, og hvussu henda eftirútbúgving kann samskipast við eftirútbúgving av fólki innan aðrar vinnur. Tað er av stórum týdningi, at eftirútbúgvingin lýkur ávís faklig krøv, og at ein góðtikin skeiðsváttan verður skrivað út so hvørt.

## 8. KOSTNAÐUR

Kostnaðurin av at byggja eina miðstøð, sum er í uppskoti frammanfyri, er í sera stóran mun treytaður av, hvar hon verður staðsett og eftir hvørji tíðarætlan, ið bygt verður út.

Ein bólkur á Fiskivinnuskúlanum gjørdi í 1998 eitt skitsuuppskot um ein nýggjan skúla, ið eisini hevði pláss fyri menningarfremjandi verkætlanum fyri vinnuna. Hugsað varð tá um at seta fólk, ið gjørdu praktiskar royndir fyri vinnulívið, og sum kundu fylgja við menninini í grannalondunum, bæði viðvíkjandi vørumenning, marknaðarmenning, góðskumenning, leiðslumenning og menning innan framleiðslutøkni. Eisini var við í uppskotinum, at skeiðsvirksemið átti at verða økt munandi, og at ein serlig skeiðstænasta skuldi taka hesa uppgávu uppá seg.







Í skitsuuppskoti Fiskivinnuskúlans frá 1998 verður dentur lagdur á, at skúlin eigur at ganga á odda innan vitan og menning av fiskiídnaðinum og alivinnuni og vísa á nýggjar møguleikar og gongdar leiðir. Fyri at kunna røkka hetta mál lá í ætlanini, at skúlin, umframt vanlig undirvísingar- og starvsstovuhøli, eisini skuldi hava royndarhøli, bæði til fiskiídnað og til alivinnu. Við hesum hølum kundi skúlin royndarkoyra og menna verandi og nýggj framleiðslutól og annars samstarva við framleiðarar av útgerð.

Kostnaðarmetingin av skitsuuppskotinum frá 1998 var grundað á hesar útreiðslur.

- Byggibúgvið grundøki
- Bygningur 7.500.000 kr
- Royndarútgerð 6.700.000 kr
- Undirvísingarútgerð 800.000 kr
- Útgerð á sjónum til havbúnað 2.000.000 kr
- Prosjektering, eftirlit o.a. 1.500.000 kr

Roknað varð við, at heimstaðarkommunan hjá skúlanum útvegaði byggibúgvið grundøki uttan kostnað.

Rakstraræatlanin (íroknað meirvirðisgjald) var uppá tilsamans 5.690.000 kr, harav 7 størv vóru sett til nýggju menningartænasturnar hjá skúlanum.

Mett var, at uml. 500.000 kr kundu fáast í inntøku við at selja tænastur av ymsum slagi.

Um henda metingin frá 1998 skal verða grundarlag undir eini kost-



narðarmeting av miðstøðini, ið mælt verður til frammanfyri, eigur at verða havt í huga, at kostnaðarstøðið síðan tá sum heild er hækkað munandi, og at prísurin er tengdur at, hvussu nógv verður bygt í senn. Tí kann talan bert verða um eina leiðbeinandi leysliga meting, ið avvarðandi myndugleikar mugu arbeiða víðari við, tá ið endaliga avgerðin um staðseting er tikin. Tá ið talan verður um inntøkurnar hjá miðstøðini, kunnu hesar gerast rættiliga stórar, um skeiðstænastan gerst ein partur av honum, og um tey skeið verða sett í verk, sum bólkurin, ið hevur kannað henda tørv, nevnir á s. 44-45.





## 9. UPPSKOT TIL LÓG UM ÚTBÚGVINGAR INNAN FISKIÍDNAÐ OG HAVBÚNAÐ

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### Kapittul 1 Stevnumið

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri støðisútbúgving innan fiskivinnu (stytt SIF), eins og hægri próvtøku innan fiskivinnu (stytt HIF) og hava eftirlit við báðum útbúgvingunum.

**§ 2.** Støðisútbúgvingin innan fiskivinnu fevnir um yrkisliga upplæring í fiskiídnaði og havbúnaði og um yrkisgymnasialar lærugreinir.
*Stk. 2*. Útbúgvingin til hægri próvtøku innan fiskivinnu verður skipað sum ein 2 ára útbúgving, ið er framhald av støðisárinum, sbr. stk. 1. Talan er um eina almennandi og yrkisgymnasiala útbúgving, ið gevur næmingunum neyðugt grundarlag fyri hægri framhaldslestri, umframt innlit í viðurskifti vinnulívsins.

**§ 3.** Útbúgvingarnar kunnu eisini skipast sum stakgreinalestur ella sjálvlestur.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um hesi viðurskifti.

**§ 4.** Útbúgvingin fer fram í skúlum, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent.

### Kapittul 2 Upptøka

**§ 5.** Umsøkjari kann eftir umsókn verða tikin inn á støðisárið, um hann hevur lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum, enskum og støddfrøði við nóg góðum úrsliti, og eftir meting upptøkuskúlans er førur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt.
*Stk. 2*. Umsøkjari, sum hevur staðið støðisárið innan fiskivinnu, ella sum hevur samsvarandi kunnleikastøði, kann eftir umsókn verða tikin upp til 2 ára framhaldandi útbúgvingina til hægri próvtøku innan fiskivinnu, sbr. § 2, stk. 2, um upptøkuskúlin metir, at hann er førur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt og at taka útbúgvingina til ásetta tíð.
*Stk. 3*. Sum treyt fyri upptøku kann upptøkuskúlin krevja, at næmingurin tekur ávísar lærugreinir á ávísum lærugreinastigi ella ávísa eykaundirvísing.

**§ 6.** Landsstýrismaðurin tryggjar, at allir næmingar, ið lúka upptøkukrøvini sbrt. § 5, stk. 1 og 2, verða tiknir upp til útbúgvingarnar.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um upptøku og upptøkukrøv, umframt um treytir fyri upptøku av næmingum, sum ikki lúka treytirnar í § 5, stk. 1 ella 2.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um upptøkusamstarv millum miðnámsskúlar um býti av næmingum.

## Kapittul 3
## Innihaldið í útbúgvingunum

**§ 7.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um undirvísingina, her í millum um:

- vav og innihald í lærugreinunum,
- undirvísingarstig í teimum einstøku lærugreinunum,
- hvar í skipanini, lærugreinirnar koma fyri,
- minstukrøv um tal og samanseting av lærugreinum hjá einstaka næminginum, og
- møguligar lærugreinir úr øðrum gymnasialum útbúgvingum.

*Stk. 2.* Útbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at umleið tveir triðingar av undirvísingini eru kravdar lærugreinir og ein triðingur er vallærugreinir.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at lærugreinir úr øðrum gymnasialum útbúgvingum kunnu gerast partur av útbúgvingini.

**§ 8.** Í støðisárinum eins og í útbúgvingini til hægri próvtøku innan fiskivinnu endar undirvísingin við próvtøku.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir gjøllari reglur fyri SIF- og HIF-próvtøkurnar, her í millum um pensumuppgevingar, próvdøming, próvtøl, ársmet og eftirmeting.

**§ 9.** Næmingi við serligum fakligum tørvi kann verða bjóðað avmarkaða stuðulsundirvísing.
*Stk. 2.* Næmingur við breki kann fáa serliga undirvísing ella sernámsfrøðiligan stuðul eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.
*Stk. 3.* Fyri næmingar, sum vegna sjúku ikki kunnu fylgja vanligu undirvísingini í skúlanum í longri tíð, kunnu undirvísingartiltøk verða framd eftir reglum um sjúkraundirvísing, sum landsstýrismaðurin ásetir.
*Stk. 4.* Einstaka næminginum verður boðin útbúgvingar- og yrkisvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetir.

## Kapittul 4
## Leiðsla

**§ 10.** Skúlastjóri skal, fyri at verða settur í starv, hava lokið prógv frá hægri lærustovni og hava námsfrøðiliga útbúgving.
*Stk. 2.* Skúlastjórin hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av dagliga virksemi skúlans.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann geva skúlastjóranum boð í námsfrøðiligum málum.
*Stk. 4.* Skúlastjórin hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av



undirvísingini og próvtøkunum í skúlanum.
*Stk. 5*. Skúlastjórin leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skúlanum og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum, her í millum um upptøku av næmingum.
*Stk. 6*. Skúlastjórin heldur próvtøku og skrivar út prógv.

## Kapittul 5
## Lærarar

**§ 11.** Lærari, ið undirvísir í gymnasialum lærugreinum, skal, fyri at verða settur í fast starv, hava lokið prógv frá hægri lærustovni í teimum lærugreinum, hann undirvísir í.
*Stk. 2*. Lærari, ið undirvísir í yrkislærugreinum, skal, fyri at verða settur í fast starv, hava hóskandi fakliga útbúgving, umframt starvsroyndir.
*Stk. 3*. Lærari skal, í seinasta lagi 2 ár eftir setan í fast starv, hava staðið námsfrøðiliga próvtøku eftir reglum, ið verða ásettar av landsstýrismanninum.
*Stk. 4*. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um førleikakrøv, her í millum um útbúgving og verkligar royndir, sbr. stk. 1, 2 og 3.
*Stk. 5*. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri gera undantak frá ásetingunum í hesari grein.

## Kapittul 6
## Fígging

**§ 12.** Landsstýrismaðurin útvegar yrkisskúla rakstrarstuðul til góðkent undirvísingarvirksemi sbrt. § 1.
*Stk. 2*. Studningur kann verða veittur til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, útbúgving av lestrarvegleiðarum og faklig skeið.

**§ 13.** Undirvísingin er ókeypis fyri næmingin.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir reglur fyri gjald fyri stakgreinaundirvísing og sjálvlesandi í sambandi við undirvísing og próvtøku.
*Stk. 3*. Næmingurin skal sjálvur útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.
*Stk. 4*. Landsstýrismaðurin kann heimila skúlanum at taka gjald fyri ljóstøk, ið verða nýtt í undirvísingini.

## Kapittul 7
## Kærur

**§ 14.** Kæra um avgerð skúlastjórans í námsfrøðiligum málum, og kæra um avgerðir tiknar í sambandi við próvtøku, kunnu í seinasta lagi 7 dagar eftir, at avgerð er kunngjørd næminginum, leggjast fyri landsstýrismannin eftir reglum, ið verða ásettar av landsstýrismanninum.

## Kapittul 8
## Aðrar ásetingar

**§ 15.** Næmingarnir hava møtiskyldu og skyldu at lata inn kravd avrik.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

**§ 16.** Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá reglunum í hesi lóg fyri at fremja royndar- og menningarvirksemi.
*Stk. 2*. Royndar- og menningarvirksemið má ikki skerja møguleikar næminganna at nýta teirra útbúgving sum støði undir hægri framhaldslestri, og ei heldur um rættindi og møguleikar teirra á annan hátt.

**§ 17.** Skúlin skal hava næmingin tryggjaðan móti skaðum, sum hann kann verða fyri undir skúlagongdini og starvsroyndunum.

## Kapittul 9
## Gildiskoma

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. august 2002.
*Stk. 2*. Samstundis sum henda lóg kemur í gildi, fer løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 um Føroya Yrkisskúla fyri Fiskaídnað og Havbúnað við seinni broytingum úr gildi.
*Stk. 3*. Reglurnar í løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 við seinni broytingum eru tó galdandi fyri næmingar, sum eru byrjaðir útbúgving til hægri próvtøku innan fiskivinnu áðrenn 1. august 2002.

Tórshavn, xx. xx 2001







## 10. SAMANDRÁTTUR

Nevndin hevur í arbeiði sínum lagt mesta dentin á at greina tørvin hjá fiski- og alivinnuni innan høvuðsøkini skeið, miðnámsútbúgving, tænastur til vinnuna og verkætlanir í sambandi við hægri útbúgving. Harafturat hevur nevndin lýst verandi útbúgvingarviðurskifti og framtíðar tørvin á førleikum innan vinnurnar. Nevndin vísir á, at sum er, er mangan torført hjá føroyskum virkjum í fiski- og alivinnuni at manna størv, har neyðugt er við fólki við hægri útbúgvingum. Um ikki so langa tíð kemur fiski- og alivinnan harafturat at kappast við eina komandi oljuvinnu um starvsfólk. Tí liggur spurningurin um rekruttering eisini frammalaga, tá ið útbúgvingarviðurskiftini verða viðgjørd.

Víst verður á, at tað er umráðandi at fáa eitt tættari samband millum vinnulívið øðrumegin og undirvísing, gransking og menning hinumegin. Mett verður, at ein miðstøð fyri fiskiídnað og havbúnað er eitt gott stað hjá pørtunum at samstarva. Nevndin mælir tí til, at miðstøðin verður sett á stovn í miðøkinum, og at hon verður staðsett nærhendis einum fjøltáttaðum vinnulívi, soleiðis at til ber at gagnnýta hvønn annan sum mest. Miðstøðin eigur at fevna um tríggjar eindir viðvíkjandi undirvísing, menning og kunning. Mælt verður somuleiðis til, at miðstøðin verður skipað sum sjálvsognarstovnur við einum stýri, har avvarðandi partar eru umboðaðir.

Nevndin mælir eisini til, at farið verður undir eftirútbúgvingarskeið fyri starvsfólk innan tey ymsu økini sum skjótast, og ger samstundis vart við, at hesi skeið ikki eru treytað av, hvar og nær miðstøðin verður sett á stovn.

Ein sera varin, leyslig kostnaðarmeting er gjørd við støði í einum uppskoti frá Fiskivinnuskúlanum frá 1998, men áherðsla er løgd á, at ein neyv kostnaðarmeting má gerast, tá ið myndugleikarnir hava tikið avgerð um staðseting av miðstøðini.

Eisini er tilevnað eitt uppskot til lóg um fiskivinnuútbúgvingar, ið dagførir verandi útbúgvingar á miðnámsstigi – støðisútbúgving innan fiskivinnu, eins og hægri próvtøku innan fiskivinnu – á Fiskivinnuskúlanum.

# FYLGISKJØL

## Bólkafrágreiðingar

Sum nevnt í frágreiðingini frammanfyri, er størsti parturin av nevndararbeiðinum farin fram í 4 bólkum, sum hvør í sínum lagi hava skrivað frágreiðing.

Hesir bólkar hava lýst støðuna á hvør sínum øki og harafturat gjørt tilmæli um, hvussu komið verður víðari. Talan er um tilfar, ið eigur at verða nýtt sum grundarlag, tá ið arbeitt verður víðari við einstøku einstøku pørtunum av virkseminum á eini komandi miðstøð fyri fiskiídnað og havbúnað. Frágreiðingarnar kunnu tí vónandi gerast eitt hent amboð hjá teimum, ið skulu arbeiða við førleikamenning og samstarvi millum vinnu, undirvísing og gransking komani árini.

## A Skeið

### Inngangur

Arbeiðsbólkurin hevur í ávísan mun viðgjørt evnið óheft av høvuðsarbeiðssetninginum, nevniliga at nevndirnar skulu koma við uppskoti til ein útbúgvingar- og menningardepil. Tað vil siga, at bólkurin ikki hevur tikið sum givið, at skipanarligar broytingar verða gjørdar beinan vegin, men at viðkomandi útbúgvingarstovnar kunnu koma at virka undir verandi karmum í eina tíð afturat. Arbeiðsbólkurin ímyndar sær tó, at útbjóðing av skeiðum á einstøku skúlunum undir eini nýggjari eftirútbúgvingarskipan skal samskipast av Mentamálastýrinum.

Í fyrsta lagi hevur arbeiðsbólkurin valt henda framferðarhátt, tí hann frá byrjan ikki kundi vita, hvørji úrslit hinir bólkarnir komu til. Í øðrum lagi heldur arbeiðsbólkurin tað hava skund, at hóskandi eftirútbúgvingarskipan verður sett á stovn. Tað tekur langa tíð at uppbyggja fjøl-táttað skeiðsútboð, og hetta tilskilar, at byrjað eigur at verða so skjótt sum til ber og um neyðugt innan verandi karmar.

Tá ein útbúgvingar- og menningardepil fer at virka, er tað sjálvsagt, at eftirútbúgvingin gerst ein partur at virkseminum hjá deplinum.

### Bakgrund – hví er eftirútbúgving neyðug?

Útbúgving elvir til størri tilvitan um arbeiðið, gevur betri úrslit í framleiðsluni og stuðlar eisini uppundir neyðugu tilgongdina av starvsfólki. Tá ein vinna setir stór krøv til førleikan hjá starvsfólkinum, stendur hon eisini hægri í metum manna millum, eins og at hetta er við til at økja um virðingina hjá starvsfólkunum sjálvum fyri egnum arbeiði.

## Broyttar umstøður

Fyritreytirnar fyri vinnuvirksemi broytast nógv skjótari nú enn fyrr, og tillagingin hjá fyritøkunum til broyttu umstøðurnar skal tí vera tilsvarandi skjótari.

Tað ber ikki til at hugsa sær fyritøkur í rívandi menning við starvsfólki, sum standa í stað vitanarliga. Starvsfólk mugu umstilla seg skjótari enn fyrr til at gera nýggjar uppgávur og til at luttaka í virkisrakstrinum á ein annan hátt, enn tey fyrr hava gjørt.

Fyritøkurnar skulu alsamt betra bæði vørur og rakstrarúrslit, lúka strangari marknaðarkrøv og myndugleikakrøv, leggja um til nýggja tøkni, hava størri fyrilit fyri umhvørvinum, skipa eitt betri arbeiðsumhvørvi o.a.m.

Virkisleiðsla og leiðslumenning fær við hesum broytt innihald. Tað verður nú meira umráðandi, at leiðsla og arbeiðsfólk hava felags mál at stevna móti og felags fatan av, hvat er umráðandi hjá fyritøkuni og í arbeiðinum hjá tí einstaka. Tað einstaka starvsfólkið skal í størri mun enn áður taka egnar avgerðir út frá eini heildarfatan.

Hvør einstøk fyritøka megnar ikki at reika fyri nøktandi vinnuligari upplæring av hvørjum einstakum starvsfólki. Eins og á so mongum øðrum økjum, so skal serkunnleiki eisini upp í upplæringina.

Í grannalondum okkara skipa vinnan og tað almenna í felag fyri einum hópi av útbúgvingum, sum arbeiðsmarknaðurin ynskir. Í Føroyum hava vit enn ongar formligar karmar um arbeiðsmarknaðarútbúgving, og tilboðini um útbúgving av teimum, sum starvast í fiski- og alivinnuni, mugu haldast at vera alt annað enn nøktandi.

Teir formligu karmarnir krevja nágreiniliga politiska viðgerð, fyri at vit m.a. kunnu fáa eina greiða skipan av fíggjarliga partinum í eftirútbúgvingunum.

## Spurnarkanning

- *hvussu fer kappingarumhvørvið hjá fiskiídnaði, fiskiflota og alivinnu at broytast frameftir*
- *hvørjar avleiðingar fáa broytinganar í kappingarumhvørvinum fyri fiskiídnað, fiskiflota og alivinnu*

Hetta eru spurningar, sum arbeiðsbólkurin setti sær fyri at kunna meta um eftirútbúgvingartørvin hjá vinnuni. Bólkurin setti eina røð av sjónar-

miðum fram, sum síðani vóru send einum úrvali av virkisleiðslum (stjórum) og einstøkum fakfelagsleiðarum. Tilsamans umboða hesi størsta partin av føroyskum fiskiídnaði, fiskiflota og alivinnu.

Umframt at taka støðu til hvørt einstakt sjónarmið vóru hesi fólkini eisini biðin um at siga, hvussu nógv tey fóru at gera burtur úr hvørjum einstøkum sjónarmiði í framtíðini.

Herumframt gjørdi arbeiðsbólkurin yvirlit yvir skeiðstilboð, sum virkisleiðslur og fakfelags-leiðarar eisini vóru biðin at meta um.

Svarini frá virkisleiðslum og fakfelagsleiðarum eru víst í hjáløgdum skjølum:

| | |
|---|---|
| Skjal 1: | Ynskilig og neyðug skeiðstilboð – samandráttur 1 (høvuðsynski) |
| Skjal 2: | Ynskilig og neyðug skeiðstilboð – samandráttur 2 |
| Skjal 3: | Svar frá alivinnuni – samandráttur |
| Skjal 4: | Svar frá fiskiídnaðinum - samandráttur |
| Skjal 5: | Svar frá fiskiflotanum - samandráttur |

Samanumtikið kann sigast, at virkis- og fakfelagsleiðarar eru rættiliga samdir við arbeiðsbólkin um, hvussu kappingarumhvørvið hjá vinnuni fer at broytast, og hvussu hetta fer at ávirka vinnuna.

Svarini upp á spurningin ”Hvussu nógv fara tit at gera burtur úr hesum í framtíðini?” eru rættiliga áhugaverd og vísa, at føroyskir leiðarar bæði eru vitandi um, at tillaging er alneyðug, og at teir ætla at gera nakað við tað.

Svarini upp á spurningin ”Hvørji skeiðstilboð eru ynskilig og neyðug í framtíðini ?” vísa, at føroyskir virkis- og fakfelagsleiðarar eru samdir í, at stórur tørvur er á skeiðstilboðum til allar starvsfólkabólkar. Svarini siga eisini nógv um, hvar tørvurin verður hildin at vera størstur.

## Niðurstøður um tørvin á eftirútbúgving

Sum víst á frammanfyri so heldur arbeiðsbólkurin, at kappingarumstøðurnar hjá okkara høvuðsvinnum, eins og hjá øðrum vinnum, hava verið fyri stórum broytingum og framhaldandi fara at verða tað.

Broyttu umstøðurnar stava bæði frá altjóða gongdini við m.a. herdari kapping og strangari krøvum til framleiðarar og frá innlendis viður-



skiftum, so sum at kappingin um arbeiðsmegina fer at harðna, m.a. tí at nýggjar vinnur taka seg upp, og at fólk yvirhøvur fara at seta størri krøv til arbeiðsplássið.

Allir partar innan vinnu og almenna fyrisiting tykjast samdir um, at høgt vitanarstøði er og verður avgerandi fyri okkara framtíðar útlit.

Arbeiðsbólkurin er av tí áskoðan, at hesin táttur helst er av størri týdningi, enn nógv hava gáað eftir, og at vitanar- og førleikastigið hjá fyritøkum bara kann økjast munandi, um stór herðsla eisini verður løgd á eftirútbúgving av verandi arbeiðsmegi.

Almennar og privatar fyritøkur fara at kappast um arbeiðsmegina í størri mun, enn tær hava gjørt higartil. Um vit síggja burtur frá til- og frágongd av arbeiðsmegi, so hevur hetta ikki í sær sjálvum hægri vitanar- og førleikastig við sær. Úrslitið av bert at satsa upp á økta vitan hjá tilgangandi arbeiðsmegini (tvs. tey ungu við nýggjari útbúgving), kann gerast vinnulig og samfelagslig afturgongd.

Vinnulig, samfelagslig og einstaklinga áhugamál tilskila øll, at arbeiðsmegin skal mennast vitanarliga. Skal tað eydnast, mugu allir partar leggja orku í hetta, og skal tað nytta, má arbeiðast miðvíst.

## Dømi um eftirútbúgving innan fiskivinnu higartil

### SAM-skeiðini í Klaksvík

Í Klaksvík hava fiskavirkini, yrkisfeløgini, tekniski skúlin og landsmyndugleikarnir í felag tikið stig til eftirútbúgving av arbeiðsfólki innan fiskaarbeiði - tey sonevndu SAM-skeiðini. Styttingin stendur fyri **S**tarvsfólka **Á**støðis **M**enning. Skeiðið er býtt upp í 5 partar: innkeyp, framleiðsla, reinføri, pakking og merking, søla og flutningur.

Ein týðandi táttur á hesum skeiðum er at geva starvsfólkunum eina heildarfatan av egnum arbeiðsplássi, fyri harvið at skapa eitt størri felags tilvit um tey krøv, sum virkað verður undir. Tilsamans fáa luttakararnir breiðan kunnleika um, hvat hendir við fiskinum, frá hann verður veiddur, til brúkarin hevur hann á borðinum. Stórur dentur er lagdur á at leggja undirvísingina so tætt at arbeiðsroyndunum hjá fólki sum møguligt. Undirvíst verður ein fyrrapart hvørja viku, og hvør partur endar við, at luttakararnir skulu prógva sína vitan, um tey skulu fáa skeiðið góðkent.



Undirtøkan hevur verið sera góð, og eftirmetingar, sum skúlin ger so hvørt, vísa, at luttakararnir halda seg hava fingið nógv burtur úr. Ein fylgibólkur, ið umboðar vinnuna og myndugleikarnar, metir, at kunnleikastøðið hækkar á henda hátt, og at royndirnar higartil eggja til framhald, m.a við skeiðum í serstøkum evnum.

SAM-skeiðini eru fíggjað soleiðis, at arbeiðsgevararnir og fakfeløgini hava rindað hvør sína helvt av lønarútreiðslunum hjá luttakarunum. Fiskimálastýrið hevur stuðlað verkætlanini sambært kunngerðini "Stuðul til menning av fiskivinnu á landi". Talan var í 1999 um 250.000 kr. til gerð av undirvísingartilfari og 60.000 kr. til læraralønir.

## Skeið í innaneftirliti

Kravið í 1994 um at fiskavirkir og verksmiðjuskip skulu hava innanhýsis stýringarskipan, ið tryggjar heilsugóðskuna á fiskavørunum, sum tey selja, var heilt nýggjur táttur hjá flestu fyritøkunum at taka upp.

Veturin 1995/96 varð skipað fyri skeiðum í innaneftirliti. Málbólkurin var leiðslupersónar og serstakliga góðskuleiðarar. Talan var um 3 skeiðsmodul í ávikavist 3, 2 og 3 dagar. Ein arbeiðsbólkur umboðandi Menningarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Føroya Fiskavirking skipaði fyri skeiðunum. Skeiðsútbjóðari var Skeiðstænasta Handilsskúlans. Grunnurin til Ídnaðarfremjandi endamál fíggjaði týðandi parti av skeiðunum.

Skeiðini í innaneftirliti vóru tikin upp aftur í 1999 og nú í 2000 við Fiskivinnuskúlanum sum fyriskipara og útbjóðara. Frálærutilfarið er endurskoðað og nútímansgjørt. Hetta arbeiðið hevur Fiskimálastýrið fíggjað sambært lóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi.

Endamálið við hesum skeiðunum er at geva fyritøkunum førleika til at byggja upp og reka eitt innaneftirlitskervi.

## Skeið í fiskaaling

Fiskivinnuskúlin hevur skipað tvinni skeið á byrjunarstøði til starvsfólk í føroysku alivinnuni. Eitt skeið til ávikavist arbeiðsfólk á alistøðum á sjónum og á smoltstøðum, sum ikki hava serliga útbúgving á økinum frammanundan. Skeiðini vórðu hildin á vári 2000.

Innhaldið í skeiðunum hevur verið rættiliga breitt, og eru tey skipað soleiðis, at til ber at gera meira burtur úr einstøkum evnum eftir ynskjum



frá vinnuni. Skeiðini eru skipað sum vistarskeið, og hvørt av teimum varir tveir dagar. 90 fólk hava luttikið á skeiðunum, og áhugin hevur verið so stórur, at skeiðini verða endurtikin komandi ár.

Afturmeldingar frá alivinnuni vísa, at grundskeiðini hava verið sera væl móttikin og Fiskivinnuskúlin arbeiðir tí við at menna skeið í serstøkum evnum. Arbeitt verður við at menna serskeið til smoltstøðirnar í fyrstu syftu.

Skeiðini til alivinnuna hava ikki fingið almenna fígging, men eru fíggjað við luttakaragjaldi, sum arbeiðsplássini hava goldið. Higartil hava lærararnir sjálvir gjørt undirvísingartilfar uttan serliga samsýning. Í framhaldandi arbeiðnum at menna skeið til alivinnuna, ber ikki til at dúva upp á vælvild frá fólki. Tí verður skotið upp, at almenn fígging verður latin til gerð av undirvísingartilfari til tílík skeið í framtíðini.

## Eftirútbúgvingartilboð til fiskiídnað, fiskiflota og fiskaaling

Arbeiðsbólkurin hevur kannað útboðið av skeiðstilboðum í okkara grannalondum, og hevur millum annað út frá hesum gjørt egnar metingar um tørvin á eftirútbúgvingartilboðum. Virkisleiðslur og fakfelagsleiðarar eru síðani spurd um teirra hugsan um hóskandi útboð av skeiðum.

Talvan niðanfyri er úrslitið av hesum arbeiðinum. Tað er greitt, at tað tekur tíð at uppbyggja fjøltáttað skeiðsvirksemi, og at øll skeiðstilboðini tí ikki koma í einum. Tað, sum er mest umráðandi, er, at tað er tørvurin hjá vinnuni, tvs. fyritøkum og starvsfólki, sum stýrir útboðnum. Hesin tørvur-in broytist, sum vituligt er.

## Viðkomandi skeiðstilboð til fiskiídnað, fiskiflota og alivinnu

### Marknaður
Góðskukrøv hjá ymiskum marknaðum
Kunda- og myndugleikakrøv

### Leiðsla
Fyriskipan (organisatión)
Starvsfólkamenning

### Aling - alment
Flutningur av livandi fiski
Sjúkur og sjúkufyribyrging

### Sláturvirki
Krøv til hagreiðing av alifiski
Framleiðslureinføri/reingerð



### Alment / Fiskur og fiskavørur
Haldgóðska hjá fiski/alifiski
Vørugóðska
Vørumenning
Teldutøkni
Smáverur og reinføri/sóttreinsing
Reingerðarskeið

### Fiskiídnaður
Arbeiðsgongdin í fiskiídnaðinum
Framleiðslureinføri
Kunnleiki til hondskering
Onnur serskeið
Automatisering og úrtøka
Rávøru- og goymslustýring

### Góðska
Góðskutilvit og –hugburður
Innaneftirlit og HACCP
ISO 9000
Skipað góðskubetringararbeiði

### Alibrúk á sjónum
Almenn skeið fyri alarar á sjónum
Fóður og fóðurstýring
Onnur serskeið (t.d. ljósstýring)
Tøknilig skeið

### Smoltstøðir
Almenn skeið fyri smoltalarar
Vatngóðska
Onnur serskeið (t.d. resirkulering)
Tøknilig skeið

### Fiskivinna
Fiskivinnupolitikkur og fiskifrøði
Lóggava á fiskivinnuøkinum
Kunnleiki til medisinkistu
Kunnleiki til nautiska útgerð
Skeið fyri ungar/óroyndar fiskimenn
Tilgerð og viðlíkahald av reiðskapi
Reiðskapur og umhvørvi
Haldbari við ymiskum reiðskapi
Hagreiðingarskipanir

### Umhvørvi
Umhvørvistilvit og –hugburður
Stýring av umhvørvi (skipanir)

### Arbeiðsumhvørvi
Tilvitan/stýring av arbeiðs-umhvørvi
Arbeiðsstøður og ergonomi
Trivnaður á arbeiðsplássinum
Trygdarskeið

### Viðmerkingar til uppskotini
Arbeiðsbólkurin hevur ikki tikið støðu til, um uppskotnu skeiðsevnini í talvuni frammanfyri skulu vera sjálvstøðug skeiðsevni. Eitt skeiðstilboð kann fevna um eitt ella fleiri av evnunum. Hóskandi samanseting av tilboðum mugu skeiðsútbjóðararnir taka støðu til.

Alt eftir um málbólkurin er stjórar, millumleiðarar ella arbeiðsfólk, so kann í fleiri førum verða talan um ymisk skeið innan sama evni. Talið av skeiðum innan frammanfyri nevndu skeiðsevni kann tí verða stórt.

Arbeiðsbólkurin heldur frammanfyri nevndu skeiðsevni verða gott útgangsstøðið fyri eini føroyskari eftirútbúgvingarskipan til fólk, sum eru í vinnu. Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at útboðið av skeiðum kann býtast upp í trý:

a. Útboð av skeiðum hvørt fyri seg
Skeið fyri arbeiðsfólk eiga at vera hildin fleiri staðni í landinum, har fólk hava lætt at koma til og frá.

b. Stuttar útbúgvingar (skeiðspakkar)
Sum dømi kann nevnast grundútbúgving fyri starvsfólk í fiskiídnaðinum og tilsvarandi skeið fyri fiskimenn og fólk í alivinnuni og matframleiðslu annars. Hesar útbúgvingarnar kunnu t.d. vera liður í sjálvbodnari útbúgvingarskipan, sum fyriboðari fyri møguligari komandi kravdari skipan, har øll starvsfólk aftaná ávíst tíðarskeið (t.d. 1 ár) í vinnu skulu hava ávísa útbúgving fyri at halda fram.

c. Bíleggingarskeið
Her kann talan t.d. vera um skeið, sum eitt ella fleiri virki biðja um.

Skeiðini eiga at vera løgd til rættis soleiðis, at fólk kunnu byggja víðari á einstøk skeið til grundútbúgvingar, yrkisbræv ella aðra útbúgving.

## Tørvurin á eftirútbúgving í øðrum vinnugreinum

Tað hevur týdning, at vit longu frá byrjan eisini hugsa um tørvin á eftirútbúgving í øðrum vinnugreinum. Um arbeiðsgrundarlagið longu frá byrjan verður lagt við meira víðfevndum tørvi fyri eyga, so verður tað lættari at fáa aðrar vinnugreinar uppí, sjálvt um byrjað verður í smáum innan fiskiídnað, fiskiskap og alivinnu.

Matvøruframleiðsla til heimamarknaðin hevur á leið sama tørv sum fiskiídnaðurin, og annar ídnaður hevur eisini tørv á eftirútbúgving. Í skjali 1 eru tey skeiðstilboð frámerkt, sum mugu haldast at hava beinleiðis áhuga í øðrum vinnugreinum eisini.

## Skeiðsútbjóðarar og undirvísingarkreftir

Skúlar, sum kunnu hugsast at samstarva um vinnuliga eftirútbúgving og skeið eru:

- Fiskivinnuskúlin
- Føroya Handilsskúli (Skeiðtænastan)
- Teknisku skúlarnir
- Føroya Sjómansskúli
- Klaksvíkar Sjómansskúli
- Maskinmeistaraskúlin
- Trygdarskeiðini

Herumframt skuldu møguleiki verið fyri at fingið fólk at undirvíst frá stovnum sum Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Fróðskaparsetri Føroya, Fiskirannsóknarstovuni, eins og frá framleiðslufyritøkum og ráðgevingarfyritøkum.

Av forðingum fyri at fáa skikkað fólk til undirvísing hava hesar verið umrøddar:

- Tað hevur víst seg at vera trupult at fáa fólk frá almennum stovnum at undirvísa á skeiðum, tí undirvísingin ofta gongur í móti arbeiðsætlanum, sum stovnsleiðslan hevur við viðkomandi starvsfólkum. Hesin trupulleikin eigur at verða loystur við at fáa bindandi avtalur í lag við viðkomandi stovnsleiðarar/aðalstýri um undirvísing.
- Tá fólk skulu undirvísa langt frá heimstaði ella arbeiðsstaði í fáar tímar, ber ikki til sambært verandi skipanum at veita samsýning fyri spilltíð og útreiðslur í sambandi við flutning til og frá undirvísingarstaði. Hetta kann gerast verulig forðing fyri at skipa skeiðsvirksemi í útjaðaraøkjum ella at fáa fólk, sum hava annað starv, til at undirvísa á skeiðum. Spurningurin eigur tí at verða kannaður, og hóskandi loysn eigur at verða funnin. Brúk er fyri liðiligari skipan á hesum øki.

## Skipan av skeiðstænastu Fiskivinnuskúlans

Sum skilst kemur ein sera týðandi partur av komandi skeiðsvirkseminum, sum er ætlaður fiskiídnaðinum og alivinnuni, natúrliga at hoyra undir virkisøkið hjá Fiskivinnuskúlanum (Føroya yrkisskúli fyri fiskiídnað og havbúnað). Skeiðspakkar ella skeiðseindir innan somu virkisøki eru eisini partur av støðisárinum í komandi yrkisgymnasialu fiskivinnuútbúgvingini, sum er at síggja í skjal B. Hesi skeið verða eisini boðin út alment.

Arbeiðið at tilrættaleggja skeiðsvirksemi hava skúlastjórin og umsitingar- og praktikkleiðarin á Fiskivinnuskúlanum higartil tikið sær av afturat dagliga arbeiðnum. Skúlin hevur ikki onnur starvsfólk í føstum starvi, sum kunnu taka sær av hesi uppgávu, og arbeiðið hevur tí verið gjørt aftan á vanliga arbeiðstíð. Hetta er ikki haldgóð loysn, um talan verður um at víðka skeiðsvirksemið.

Tí er neyðugt at styrkja um tann partin av arbeiðsorku skúlans, sum skal fáast við skeiðsvirksemi. Mælt verður tí til, at skúlin fær játtan til at løna einum starvsfólki afturat, til rættilig gongd er komin á skeiðsvirksemið. Játtanin kann avmarkast til eitt ella tvey ár, til virksemið hvílir í sær sjálvum ella kastar pening av sær.



## Uppbygging og skipan av eftirútbúgving

### Alment

Sum nevnt frammanfyri, so eiga vit at hava í huga, at vinnulig eftirútbúgving er minst líka viðkomandi fyri fiskiídnað, fiskiskap og alivinnu sum fyri aðrar vinnur. Annað útgangsstøði er, at fleiri av skúlunum longu hava eftirútbúgvingar- og skeiðstilboð, sum er.

Um uppbyggingin av eftirútbúgvingarvirkseminum skal kunna ganga so skjótt og trygt fyri seg sum til ber, so eigur at verða bygt víðari á tað verandi, eins og at teir skúlar og stovnar, sum koma at fáa ein leiklut í eini víðkaðari eftirútbúgvingarskipan, verða tiknir við frá byrjan.

Hesin hugsunarhátturin førir m.a. til, at skeið í innaneftirliti og onnur skeið, sum Fiskivinnuskúlin hevur boðið út, framhaldandi verða boðin út av Fiskivinnuskúlanum, meðan tá tað ræður um skeið í dømis fyriskipan, starvsfólkamenning, góðskustýring og stýring av arbeiðsumhvørvi, so eigur at verða roknað við frá byrjan, at tørvurin er til staðar í so at siga øllum vinnum, og at samstarv millum skúlar um hesi skeið tí eru nærliggjandi.

Tað snýr seg við øðrum orðum um at fáa eitt arbeiðsbýti í lag, soleiðis at sami førleiki ikki skal byggjast upp á fleiri støðum, uttan so at hetta er neyðugt ella at tað er ein fyrimunur.

Ein týðandi táttur er at fáa hóskandi spjaðing av útbúgvingarstøðum kring landið. Tað eigur at verða miðað ímóti, at undirvísarar tilrættisleggja frálæruna í samráð við virkini og tørv teirra. Eitt tætt samband millum undirvísarar og vinnuna á staðnum kann gerast týðandi liður í økismenningini og framhaldandi menning gjøgnum útbúgving.

Ein natúrligur táttur at taka upp hjá eftirútbúgvingarskipanini er fjarundirvísing.

### Samskipan av eftirútbúgvingini

Arbeiðsbólkurin hugsar sær sostatt, at skeið verða útboðin av ymiskum skúlum, at skúlar skulu samstarva um skeið, og at skeiðini kunnu verða hildin í fleiri støðum í landinum. Herumframt skulu undirvísarar við serkunnleika innan ymisku fakøkini, sum ikki hava fast starv á einum av skúlunum, verða knýttir til eftirútbúgvingarskipanina.

Neyðugt verður tí við eini neyvari samskipan av skeiðunum, eisini áðrenn depilin er settur á stovn. Bólkurin hevur ikki tikið støðu til, hvussu hendan skal skipast, men hugsar sær, at hon í fyrstu syftu liggur í Mentamálastýrinum hjá fulltrúunum fyri avvarðandi skúlar, til depilin er settur á stovn.

Uppgávur, sum samskipandi eindin skal røkja, eru t.d. góðkenning av skeiðum undir eftirútbúgvingini, val av skeiðsoperatøri í hvørjum einstøkum føri, gerð av avtalum við einstøku skúlarnar og stovnar v.m. um frálæru á skeiðunum, góðkenning av lærarum til einstøk skeið, fyriskipan av útbúgving av lærarum, tá hetta er neyðugt, umsiting av almennari fígging o.a.m.

## Ráðgevandi nevnd

Fyri at tryggja eitt viðkomandi og aktuelt innihald í útbúgvingunum, eigur ein *ráðgevandi nevnd* at verða sett, sum metir um útbúgvingina og einstøku partarnar í henni. Í nevndini eiga at sita umboð fyri bæði arbeiðsgevarar og -takarar, umframt umboð fyri skúlar og avvarðandi aðalstýri. Sum tað sæst frammanfyri, er útbúgvingartørvurin rættiliga fjøltáttaður, og tískil er neyðugt, at nevndin umboðar breiddina í fiskivinnu, fiskiflota og alivinnuni, og at nevndin hevur gott innlit í, hvør útbúgvingartørvurin er.

Nevndin eigur, umframt at geva samskipandi eindini ráð, eisini at lata myndugleikunum eina frágreiðing hvørt ár, har ein meting eisini verður gjørd av komandi førleikakrøvunum í fiski- og alivinnuni.

## Fígging

Útreiðslurnar til skeiðsvirksemi eru í høvuðsheitum:

- Gerð av frálærutilfari
  Oftast er tað neyðugt at frálærutilfarið er á føroyskum. Við hvørt skal frálærutilfar gerast frá grundini. Í einstøkum førum ber helst til at fáa avtalu við útlendskar stovnar um brúk av frálærutilfari hjá hvørjum øðrum.
  Tað verður tí rættiliga ymiskt frá skeiði til skeið, hvussu stórur kostnaðurin av at gera frálærutilfar verður.
  Kostnaðurin av at gera frálærutilfar verður tó altíð ein eingangskostnaður, sum tað kann verða torført hjá skeiðshaldaranum at fíggja, um talan er um stórar útreiðslur, og at hesar skulu álíknast komandi skeiðum eisini. Sum dømi kann nevnast, at gerð av frálærutilfari til nýggju skeiðini í innaneftirliti (íalt 8 dagar) kostaði 213.000 kr.

- Skeiðskostnaður
  Fevnir um frálærutilfar, løn til lærarar, leigu av høli og útgerð og próvtøku v.m.

- Lønarútreiðslur hjá skeiðsluttakarum.
  Dømi: á SAM-skeiðunum í Klaksvík rindaði arbeiðsgevarin 50% av lønarútreiðslunum, meðan fakfelagið (tvs. arbeiðsfólkið sjálvt) rindaði 50%.

- Fyriskipan
  Útreiðslur til fyrireiking v.m. av skeiðum hjá skeiðshaldarum, útreiðslur til neyðuga útbúgving av lærarum v.m.

- Samskipan
  Fevnir um samskipan av skeiðstilboðum, frálærutilfari og lærarakreftum, umsiting av almennu fíggingini, samstarv við útlendskar skeiðsútbjóðarar og samskipan av skeiðum, ið fleiri skeiðsútbjóðarar eru saman um v.m.

Sum áður nevnt so eru tað ikki bara tey einstøku virkini, sum hava áhuga í eftirútbúgving av starvsfólki. Hetta er eisini týðandi samfelagsligt áhugamál, eins og at málið hevur størsta áhuga hjá tí einstaka starvsfólkinum. Fyri hesi hevur tað at mennast vitanarliga avgerandi týdning fyri vinnumøguleikarnar sum frá líður.

Arbeiðsbólkurin skjýtur tí upp, at tað almenna rindar ein týðandi part av útreiðslunum. Hetta er serliga umráðandi í uppbyggingartíðini, um verulig gongd skal koma á eftirútbúgvingina, og hon skal fáa ítøkiligan týdning frameftir.

Skotið verður upp, at viðkomandi aðalstýrir samskipa útveganina av neyðugu almennu fíggingini, og at Mentamálastýrið umsitir játtanirnar.

Uppskot til myndil fyri almennum stuðli til eftirútbúgvingarskeið (vanlig dagskeið):

| Málbólkur ➜<br>Útreiðsluslag ➜ | Arbeiðsfólk | Arbeiðsfólk og millumleiðarar | Millumleiðarar | Leiðarar |
|---|---|---|---|---|
| | Almenn skeið | Serskeið | | |
| Samskipan | 100 % | 100 % | 100 % | 100 % |
| Frálærutilfar | 100 % | 100 % | 25 % | 0 |
| Fyriskipan | 100 % | 50 % | 0 | 0 |
| Skeiðskostnaður | 50 % | 25 % | 0 | 0 |
| Lønarútreiðslur hjá skeiðsluttakarum | 25-50 % | 0 | 0 | 0 |

Møguleikin fyri at fyritøkur gjalda fyri ávísar partar av skeiðum, sum t.d. gerð av frálærutilfari, eigur eisini at vera til staðar.

Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at stuðul kann verða latin til øll góðkend skeið/skeiðsevni og samanseting av hesum skeiðsevnum til einstøk skeið, antin tey eru boðin út alment, ella tey eru umbiðin av einstakari fyritøku ella t.d. vinnuni í einum øki.

## Marknaðarføring av eftirútbúgvingini

Tað er vert at geva gætur, at forðingar stinga kunnu seg upp, tá ið ein eftirútbúgvingarskipan skal fáast at virka. Tílíkar forðingar kunnu t.d. stava frá tilvitaðari ella ótilvitaðari støðutakan til útbúgving, og hvørja nyttu útbúgving kann gera.

Um antin leiðslan ella starvsfólkið í eini fyritøku mangla álit á, at eftirútbúgving nyttar, so man tað lítið nytta at brúka tíð upp á útbúgving.

Í fyrsta lagi kann hetta siga okkum, at vit eiga ikki at hugsa so nógv um tvungnar skipanir. Ikki í fyrsta umfari í hvussu er. Í øðrum lagi eigur útboðið av skeiðum í uppbyggingartíðini at verða valt soleiðis, at størst møgulig undirtøka fæst bæði frá leiðslum og arbeiðsfólki.

Góð og álítandi marknaðarføring kann í hesum samanhangi vera avgerandi fyri at fáa eftirútbúgvingina skjótt í gongd.

Tað er umráðandi, at Mentamálastýrið setir arbeiðsbólkar at skipa innihaldið í einstøku lærugreinunum og skeiðseindunum. Í hesum sambandi hevur Mentamálastýrið tann yvirordnaða leiklutin at samskipa arbeiðið hjá bólkunum, soleiðis at tað slepst undan, at sama innihald kemur fyri í fleiri lærugreinum. Samskipanin skal eisini syrgja fyri, at lærugreinirnar stuðla upp undir hvørja aðra.

## Støðisárið

Almennu lærugreinirnar verða óbroyttar, meðan aling og fiskiídnaður ikki longur verða sjálvstøðugar lærugreinir. Tveir skúladagar eru til taks um vikuna (ella 2/5 av undirvísingartíðini), sum verða brúktir til skeið í fiskiídnaði, aling, teldulæru og starvsvenjing. Møgulig starvsvenjing verður avmarkað til serligar arbeiðsuppgávur, sum krevja maskinur, tól ella serliga praktiska venjing. Støðisárið er sjálvstøðugt, og endar við próvtøku. Næmingarnir kunnu tá taka støðu til, um teir ynskja at halda fram við Hægri próvtøku Innan Fiskivinnu, ella fara út í vinnuna.

Um pláss er á skeiðunum á skúlanum, skulu tey bjóðast út til almenningin móti gjaldi. Skúlin umsitir hesi skeið. Skeið annars, ið verða boðin út um alt landið, eru partar av eini felags samskipan.

## Annað árið

Lærugreinin informatiónsviðgerð ella kunningartøkni verður tikin av sum sjálvstøðug lærugrein, og ístaðin verður innihaldið lagt inn í einstøku lærugreinirnar í útbúgvingini og partvíst skipað sum skeið 1. árið. Næmingarnir hava higartil kunnað valt at tikið lærugreinina støddfrøði (B-stig) ella ikki. Í framtíðini skulu teir kunna velja ímillum støddfrøði B ella alisfrøði B.

Hinar lærugreinirnar verða óbroyttar, men innihaldið í serliga yrkislærugreinum eigur at verða endurskoðað.

## Triðja árið

Størsta broytingin er 3. árið, har næmingarnir kunnu velja ímillum eina fiskiídnaðarbreyt og eina alibreyt. Lærugreinirnar í báðum breytunum kunnu býtast sundur í kravdar lærugreinir, yrkislærugreinir og vallærugreinir. Hesar seinastu eru støddfrøði A ella týskt C.

## Yvirlit yvir útbúgvingina

Tíma- og lærugreinabýtið í 3-ára yrkisgymnasialu fiskivinnuútbúgvingini (Hægri próvtøka innan fiskivinnu/HIF):

<table>
<tr><th colspan="3">Støðisárið (SIF)</th></tr>
<tr><th colspan="2">Almennar lærugreinir: 3 dagar um vikuna</th><th>Yrkispartur: 2 dagar um vikuna ella 2/5 av tíðini</th></tr>
<tr><td></td><td></td><td rowspan="7">Skeið í fiskiídnaði, aling og telduskeið. Starvsvenjing/royndir á skúla ella virkjum/alibrúkum. (Starvsvenjingin verður avmarkað til serligar arbeiðsuppgávur, sum krevja maskinur, tól ella serliga praktiska venjing).</td></tr>
<tr><td>Alis-/evnafrøði C</td><td>140 t</td></tr>
<tr><td>Enskt C</td><td>140 t</td></tr>
<tr><td>Føroyskt C</td><td>140 t</td></tr>
<tr><td>Lívfrøði C</td><td>105 t</td></tr>
<tr><td>Samfelagsfrøði C</td><td>105 t</td></tr>
<tr><td>Støddfrøði C</td><td>175 t</td></tr>
</table>

| Annað árið (1. HIF) | |
|---|---|
| **Almennar og yrkisligar lærugreinir: 5 dagar um vikuna** | |
| | |
| **Kravdar lærugreinir:** | |
| | |
| Enskt B | 140 t |
| Evnafrøði B | 175 t |
| Føroyskt | 140 t |
| Matvøruframleiðslu-tøkni B | 140 t |
| Smáverulívfrøði B | 140 t |
| Virkisbúskapur B | 210 t |
| | |
| **Vallærugreinir:** | |
| | |
| Alisfrøði B | 175 t, ella |
| Støddfrøði B | 140 t |

| Triðja árið (2. HIF) | | | |
|---|---|---|---|
| **Fiskiídnaðarbreyt** | | **Alibreyt** | |
| | | | |
| **Kravdar lærugreinir:** | | **Kravdar lærugreinir:** | |
| | | | |
| Føroyskt A | 140 t | Føroyskt A | 140 t |
| Fyriskipan A | 140 t | Fyriskipan A | 140 t |
| Marknaðarførsla B | 140 t | Marknaðarførsla B | 140 t |
| Verkætlan A | 175 t | Verkætlan A | 175 t |
| | | | |
| **Yrkislærugreinir:** | | **Yrkislærugreinir:** | |
| | | | |
| Fiskivinna B | 140 t | Alilívfrøði A | 175 t |
| Framleiðslufak B | 140 t | Alitøkni B | 140 t |
| Matvørulæra A | 175 t | Havbúnaður B | 140 t |
| | | | |
| **Vallærugrein:** | | **Vallærugrein:** | |
| | | | |
| Støddfrøði A | 175 t | Støddfrøði A | 175 t |
| Týskt C | 140 t | Týskt C | 140 t |

## Tær báðar breytinar

*Yrkislærugreinarnar, ið mynda tær báðar breytirnar, kunnu í stuttum lýsast við hesum endamálsorðingum:*

## Framleiðslubreytin

### *Matvørulæra A*

**Næmingarnir skulu hava kunnleika til:**

- Almenna matvørulæru og evnisskiftið í mannakroppinum.
- Kostvanar og –kanningar og skilagóðar kostætlanir. Sambandið millum kost og sjúkutrupulleikar.
- Fiskaevnafrøði. Evnafrøðilig samanseting í vanligum fiskasløgum og broytingar í fiski áðrenn og aftan á hann er deyður.
- Haldbari av matvørum - serliga fiskavørum. Ílatingarevni og praktisk nýtsla av teimum (positivlistin).
- Góðskuhondbøkur og góðskustýringarskipanir/innaneftirlitskipanir.
- Keypara- og myndugleikakrøv til matvøruframleiðslu.

### *Framleiðslufak B*

Lærugreinin skal geva kunnleika til framleiðsluútgerð 1) og framleiðslustýringsamboð 2), til tess at næmingurin skal hava innlit í hvussu framleiðsluvirki eru fyriskipað.

1) Framleiðsluútgerð (hardware):
Lærugreinin skal fevna um frálæru um framleiðsluútgerð, t.e. maskinelt og tekniskt innlit í hvørji amboð í høvuðsheitum verða nýtt á einum framleiðsluvirki, t.d.:

- Rá- og liðugtvøruskiljarar
- Ísing-, køling- og tiðningsamboð
- Skerimaskinur
- Flow-linjur
- Portiónsskerarar
- Frysting (IQF, plátu, vertikal…)
- Salting (sproyta, laki, salt…)
- Royking (ovnur..)
- Frystigoymsla
- Annað

2) Framleiðslustýringsamboð (software):
Lærugreinin skal fevna um frálæru um framleiðslustýringsamboð, t.e. innlit í stýringsskipanir, ið verða nýttar á einum framleiðsluvirki, t.d.:

- Støddarskiljing av ráfiski
- Úrtøkuoptimering (skerihættir, býti…)
- Framleiðsluoptimering (arbeiðsløn, orka, pakningur...)
- Framleiðsluútrokningar
- Teldustýrisskipanir – “vertikal integratión”
- Køli og frystitøkni
- Annað

*Fiskivinna B:*

**Næmingarnir skulu hava kunnleika til:**
- Grundarlagið fyri fiskiskapi. Havfrøðilig og havevnafrøðilig viðurskifti, sum hava týdning fyri fiskiskap undir Føroyum.
- Fiskifrøði og veiðustýring. Dentur verður lagdur á stovnsmetingarhættir og stýringsamboð, sum verða brúkt í Føroyum.
- Fiskileiðir hjá føroyskum skipum og um reiðskapin skipini brúka. Reiðskapur og góðska á fiskinum.
- Hvussu søla av fiski fer fram millum skip og virki. Um uppboðssølu.
- Handilsviðurskifti við høvuðsmarknaðir. Menningarmøguleikar og –forðingar.
- Búskaparlig og sosial viðurskifti hjá teimum, sum starvast í fiskivinnuni á sjógvi og landi.
- Galdandi lóggáva á fiskivinnuøkinum.

**Alibreytin:**

*Alilívfrøði A:*

**Næmingarnir skulu hava kunnleika til:**
- Fiskasløgini, sum verða nýtt í aling, ella sum møguliga verða nýtt í framtíðini (anatomi, fysiologi, lívsringrás, útbreiðsla í natúruni og umhvørviskrøv).
- Lívfrøðiligar forðingar í samband við ”nýggj” fiskasløg í aling.
- Alis-/evnafrøðilig viðurskifti í vatni og sjógvi. Næmingar skulu duga at gera vanligar umhvørvismátingar og kunna meta um, hvussu aling ávirkar umhvørvið.
- Kynbótararbeiði við serligum atliti til føroysk viðurskifti.

- Fiskasjúkur, smittuspjaðing og fyribyrgjandi arbeiði.
- Fóður, fóðursamanseting, fóðurútrokningar, fóðurframleiðslu o.s.v.
- Neyðugar mátingar í praktiskari aling og duga at nýta neyðug kemisk evni á rættan hátt.

*Alitøkni B:*

**Næmingarnir skulu hava kunnleika til:**
- Kør, ringar, stálanlegg og annan útbúnað, sum verður brúktur á smoltstøðum og alistøðum á sjónum.
- Hvussu tekniska útgerðin á smolt- og alistøðum virkar, og hvussu hon verður brúkt (íroknað telduútgerð og –forrit).
- Nýtslu og viðgerð av vatni sum t.d. partikulreinsing, sóttreinsing, reinsing í samband við resirkulering, lufting/ilting og upphiting.
- Nýtslu av ljósi í samband við vøkstur og smoltifisering.
- Týdningin av ymsum framleiðsluætlanum, sum t.d. vakstrarforsagnir, fellis- og fóðurforsagnir og vatnnýtsluforsagnir.
- Faktorar, sum hava týdning fyri trivnaðin og trygdina hjá starvsfólki og fiski.
- Galdandi góðskukrøv á ráværu og lidnari vøru.
- Neyðugt viðlíkahald á útbúnaði og útgerð.
- Galdandi lóggávu og reglur á aliøkinum.

*Havbúnaður B:*

**Næmingarnir skulu hava kunnleika til:**
- Dagligt arbeiði og viðlíkahald á smoltstøð, alibrúki á sjónum og møguliga alistøð ”á landi”.
- Stýring av umhvørvisviðurskiftum á støðini við nýtslu av tekniskari útgerð.
- Dagligt eftirlit á støðini og støðutakan til óvæntaðar hendingar.
- Duga at føra skrásetingarskráir fyri viðlíkahald og framleiðslu.
- Rætta skiljing, viging og flyting av fiski, soleiðis at fiskurin ikki fær mein ella verður strongdur óneyðugt.
- At geva rætta fóðurnøgd, -slag og -stødd út frá væntaðum og veruligum vøkstri.
- Heilsufrøðiliga rættar arbeiðsgongdir og reinføri í dagliga arbeiðnum.
- At leggja ætlanir um og koppseta alifisk.
- Duga at skipa tøku og hagreiðing av tiknum fiski eftir galdandi reglum.

## Fíggjarligar avleiðingar

Við fjølbroyttari valmøguleikum og við ali- og framleiðslubreyt má roknast við eini øking av kostnaðinum í mun til verandi útbúgving. Lutfalsliga kostnaðarøkingin fyri hvønn næming er sjálvsagt tengd at samlaða næmingatalinum. Talið av næmingum á Fiskivinnuskúlanum hevur í meðal ligið um 35. Ber til at vaksa munandi um næmingatilgongdina framyvir, kunnu útbúgvingartilboðini fullnýtast so mikið, at talan ikki nýtist at verða um eina dýrari útbúgving enn tær, ið finnast innan miðnámsøkið annars.

Fíggjarligu útlitini fyri útbúgvingina eru sostatt treytað av undirtøkuni millum tey, sum ætla sær undir eina miðnámsútbúgving, og í hvønn mun fiskiídnaðurin og alivinnan stuðla uppundir hana í sínum starvssetanum.



## C Verkætlanir og støðið undir teimum

### Fortreytir

Bólkurin hevur lagt tað mesta av síni orku í at greina tað útbúgvingar- og granskingarhøpi, sum komandi verkætlanir, ið viðvíkja fiskiídnaði og havbúnaði, eiga at vera ein partur av. Valt var tí at arbeiða við eini útbúgving í matvørufrøði við serligum atliti at fiski, sum kann verða fakliga støðið undir verkætlanunum. Hugsað er eisini um, at m.a. Fróðskaparsetrið, Fiskirannsóknarstovan og Heilsufrøðiliga Starvsstovan longu arbeiða á økinum, og at ein samhugsan av hægri útbúgvingum, miðnámi og skeiðsvirksemi, ið arbeiðssetningurin hjá nevndini leggur upp til, má gerast í samráð við hesar stovnar.

### Um matvøruútbúgving og -gransking

Lívsgrundarlagið undir føroyska samfelagnum er sum kunnugt framvegis tað tilfeingi, sum finst á sjónum, tað veri seg kring Føroyar ella á meira fjarskotnum leiðum. Fiskivinnan og havbúnaðurin eru tí tey bæði beinini, sum vit standa á, og tí ræður um, at menna tað, sum er knýtt at hesum vinnum. Í alt størri mun gerast krøvini til fiskin, sum vit selja, strangari, og í kappingini við onnur lond er alneyðugt at fáa sum mest burtur úr innan tey ymsu liðini í framleiðsluni.

Tað ið talan er um brúkararnar, leggja teir stóran dent á føðsluvirðið í matinum, og krøvini um reinføri eru í dag bygd inn í framleiðsluna. Skulu vit framleiða vørur, sum liva upp til hesi krøv, er tað av týdningi, at tey, sum starvast í vinnuni, hava gott innlit í evnafrøðiligu samansetingina av matinum og góðskuna, sæð frá einum smáverulívfrøðiligum sjónarmiði. Harafturat mugu hesi fólk hava kunnleika um, hvussu framleiðslugongdin ávirkar týðandi føðsluevni, smáverulívfrøðiligu góðskuna, smakk, tættleika og haldevni.

Tí verður stórur dentur lagdur á at útbúgva fólk á hægri stigi til at stýra matframleiðsluni eftir teimum krøvum, sum brúkarar og myndugleikar seta. Talan er um útbúgvingar, ið krevja eitt gott natúruvísindaligt støði at standa á, í stødd-, alis- og evnafrøði, eins og í smáverulívfrøði og bioteknologi.

Vanliga er gransking knýtt at hesum útbúgvingum. Talan kann bæði vera um grundgransking og nýtslugransking. Endamálið er at fáa økta vitan um ráevni í matvørum, sjálva framleiðsluna av matvørum, matvørutrygd og matvørugóðsku. Granskingin skal lýsa og royna at greiða teir spurningar, sum matvøruframleiðarar og brúkarar seta.



## Granskingarumhvørvið í Føroyum

Í 1980-árunum arbeiddi Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum við ætlanum um eina útbúgving innan matvørur á BS-stigi. Í tí sambandi var eitt starv skipað á Náttúruvísindadeildini, og eitt uppskot um eina 3-ára gongd var gjørt, men orsakað av stórum sparingum á stovninum frá 1990 og frameftir, gjørdist ætlanin ongantíð veruleiki. Tó er henda ætlan við millumbilum tikin fram, og víst er á tað ynskiliga í, at hon verður sett í verk, tá ið umstøður eru til tess.

Aðrir stovnar hava eisini granskingarvirksemi, sum er tengt at fiskivinnu. Fyrst er at nevna Fiskirannsóknarstovuna, sum við sínum kanningum av lívfrøðini og stovnsmetingunum av ymsum fiskasløgum, er ein sera týðandi partur av tilrættisleggingini av fiskivinnuni í Føroyum. Reglubundnar kanningar av fiskatilfeingi, framleiðslu av æti og havumhvørvinum er grundarlagi undir tilmælunum frá stovninum. Umframt hetta eru verkætlanir av ymsum slag. Sum dømi kunnu nevnast viðurskiftini á Føroya Banka, gongdina hjá laksi norðanfyri Føroyar, merking av toski, fiskiskapur við ábyrgd herundir ymisk veiðuamboð til ymisk fiskasløg, og um sjófugl í Føroyum. Flestu av hesum verkætlanum eru gjørdar í samstarvi við aðrar hægri granskingar- og lærustovnar í øðrum londum. Slík sambond eru sera gevandi fyri føroyskar granskarar. Umframt regluliga eftirliti við havumhvørvinum luttekur Fiskirannsóknarstovan í altjóða verkætlanum um streymgongdina í norðureystur Atlantshavi í einum umfatandi vísundaligum samstarvi við onnur norðurlond, eins og við stovnar innan ES, sum fáast við veðurlagsbroytingar í norðurhøvum eins og í heiminum sum heild. Fiskirannsóknarstovan luttekur í samstarvinum innan ICES á nógvum økjum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hýsir eisini granskingarvirksemi, umframt vanliga kanningar-arbeiðinum. Tær granskingarverkætlanir, sum fara fram á stovninum, eru lutvíst fíggjaðar av øðrum aðalstýrum, lutvíst av norðurlendskum pengum, eins og vinnan er við til at fíggja ein lítlan part. HS luttekur í altjóða samstarvinum innan fiskiídnaðargransking WEFTA og skipaði fyri ársfundinum hjá felagsskapinum í Føroyum í 2000.

Umhvørviseftirlitið, sum er ein týðandi partur av virkseminum hjá heilsufrøðiligu Starvsstovuni, ger seg eisini galdandi í felagsnorðurlendskari verkætlanum um eftirlit av umhvørvinum kring strendurnar og í mátingum av PCB-innihaldinum í fiski. Eisini er ein verkætlan við tí endamáli, at kanna eiturinnihaldið í ymsum djórasløgum í føroyskum havumhvørvi.

Gransking innan havgsúgdjór fer fram á Náttúrugripasavninum. Bæði innan hetta øki og kanningar av sjófugli er samstarv við Fiskirannsóknarstovuna.

Biofar-royndarstøðin var sett á stovn á 1988 sum liður í einum norðurlendskum samstarvi. Umframt játtanina á fíggjarlógini, hevur Biofar eisini fingið fitt av stuðli úr privatum grunnum. Upprunaliga verkætlanin var at kanna djóralívið á botni, har talan er um djúpt vatn, men tá henda verkætlan var liðug, var farið víðari at kanna lívið á botni nærri landi – út til 100 metra dýpi. Í báðum verkætlanum hevur verið tætt samstarv við útlendskar granskarar.

Hóast ætlanin um matvøruútbúgving ikki vann frama á sinni, hevur tann skjótt vaksandi alivinnan lagt støðið undir ávíst kanningararbeiði og gransking. P/F Fiskaaling var í nógv ár undir leiðslu av Fiskirannsóknarstovuni , men við vaksandi virkseminum, serliga innan kynbótaarbeiði, arbeiðir P/F Fiskaaling nú sum eitt privat partafelag, sum tó tekur á seg serligar uppgávur fyri ta almenna. Av hesum serliga kynbótaarabeiði av laksi og gransking innan laksa- og sílaaling, men felagið er eisini í ferð við at menna gransking innan kalvaaling og hevur umstøður til gransking innan aling av øðrum fiskasløgum eisini. P/F Fiskaaling stendur fyri umfatandi rogna- og smoltframleiðslu. Í hesum sambandi fer eitt miðvíst kynbótararbeiði fram við Áir og á lívfiskastøðini í Skopun. Kanningararbeiðið hevur t.d. snúð seg um, hvønn týdning ljós- og hitaviðurskifti hava í smoltframleiðsluni. Eisini verður arbeitt við kalvaaling á nýggjari royndarstøð í Nesvík.

Sostatt finnast tilsamans rættiliga nógvar vísundaligar verkætlanir, ið eru knýttar at ymiskum stovnum, og sum snúgva seg um havumhvørvið. Stovnarnir hava samarbeitt og samarbeiða á fleiri økjum um serligar verkætlanir, tó uttan at at nøkur miðvís samskipan av hesum virkseminum er . Hetta merkir at vit møguliga ikki fullnýta tær íløgur, sum í dag verða lagdar í granskingar- og menningararbeiðið. Eitt skipað samstarv millum stovnarnar innan fiskivinnu- og havbúnaðargransking, har partur av virkseminum fór fram á eini felags miðstøð, hevði skapt eitt umhvørvi innan hesa gransking, har vinnan eisini kundi komið við sínum ynskjum.

### Uppskot um BS í matvørufrøði

Við at endurskoða upprunaliga uppskotið um eina matvøruútbúgving, er komið fram til eina 3-ára útbúgving, sum bólkurin heldur vera hóskandi til tann tørv, sum er í dag, og sum kann rúmast innan fyri karmarnar hjá



undirvísingarumhvørvinum. Roynt er í mestan mun at samansjóða lesturin við BS-útbúgvingina í lívfrøði, soleiðis at innihaldið í stóran mun er felags fyri báðar útbúgvingarnar. Hetta merkir, at tey lesandi hava somu lærugreinir fyrsta árið, eins og felags lærugreinar eisini eru seinni, soleiðis sum yvirlitið vísir:

| | 10% – 30% | | 30% – 50% | | 50% – 70% | | 70% – 90% |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Eiturvistfrøði og dálking | | Verkætlan | | | | |
| 5 | Føðslulívvirkisfrøði | | Góðsku-stýring & -kanningar | Matvøru-evna-frøði | Matvørugóðska | Matvøru- & smáverulívfrøði & reinføri | |
| 4 | Plantu- & djórafr. | Hagfrøði 2 | Almenn smáverulívfrøði | | Matvøruevnafrøði | Fiskitøkni | Matvørulóggáva |
| 3 | Lívevnafrøði | | Kyknulæra | | Arvalæra og mýlislívfrøði | Vísinda-ástøði | Matvørutøkni |
| 2 | Evnafrøði | | Hagfrøði 1 | | Ryggdýr | Plantu-skipan | Almenn vistfrøði |
| 1 | Evnafrøði | | Støddfrøði | | KT | Ryggleys dýr | Plantubygnaður og navnagreining |

Felags við lívfrøðilesturin

Viðvíkjandi teimum einstøku lærugreinunum er at siga, at fyrsta hálvtannað árið verða grundleggjandi tættirnir lisnir saman við teimum lívfrøðislesandi. Lærugreinirnar eru nærri lýstar á: **http://www.sleipnir.fo/setur/nvd/nvd75.htm.** Síðan er í stóran mun talan um lærugreinar, ið geva serligan førleika innan matvøruframleiðslu, bæði til próvtøku á bachelor-stigi, og sum grundarlag undir framhaldandi lestri á master-og Ph.D.-stigi.



## Upptøkan í 2001, lívfrøði

Fróðskaparsetrið tekur inn lesandi til tey ymsu námini við føstum millumbilum. Summarið 2001 verður aftur tikið inn til lívfrøðilestur. Skulu hesi lesandi kunna fáa matvøruútbúgvingina bygda inn í sín lestur, er neyðugt, at fyrireikingar verður gjørdar til hetta sum skjótast, og neyðug játtan verður veitt til endamálið.

Hetta merkir, at starvsfólk mugu setast til undirvísingina í matvøru-frøðiligu lærugreinunum í 2003 og frameftir, men eisini, at innihaldið í einstøku lærugreinunum má fastleggjast í longu í komandi ári. Til hetta endamál eigur ein bólkur av fakfólki at verða settur, sum hevur gott innlit í tey ymsu fakøkini, og sum kann orða nærri um hesi.

## Sambandið við vinnuna

Tað er umráðandi, at útbúgvingin í matvørufrøði og tær ymsu verkætlan-irnar, ið verða knýttar at henni, hava eitt hóskandi tilknýti til fiskivinnuna og havbúnaðin. Tí eigur Fróðskaparsetrið at skipa ein fylgibólk, har vinnan (t.e. í hesum høpi Havbúnaðarfelagið, Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið) eisini kann gera ávirkan galdandi.

## Fígging av verkætlanum

Sum nevnt frammanfyri, fara verkætlanir fram á teimum ymsu stovnu-num, bæði við føroyskari og útlendskari fígging. Føroyski parturin av verkætlanunnum hjá Fiskirannsóknarstovuni og Heilsufrøðiligu Starvs-stovuni verður fíggjaður av játtanini til fiskivinnuroyndir (8 mió. kr. í 2001), verkætlanirnar hjá P/F Fiskaaling verða fíggjaðar um játtanina til Vinnumálastýrið, meðan Fróðskaparsetrið fíggjar sínar verkætlanir aðrar vegir. Spurningurin hevur verið settur, hvussu fíggingin av verkætlanum innan eina skipaða fiskivinnugransking eigur at skipast. Bólkurin heldur, at vit eiga at hava eina fasta játtan á fíggjarlógini til granskarar og Ph.D.-lesandi. Byrjað kundi verið við 4-5 kompetentum granskarum, sum vóru settir í fast starv og 3-4 Ph.D.-stipendiatum. Hetta fyri at skapa eitt um-hvørvi, sum beinanvegin setur kontinuitet og dygd innan gransking í há-sæti.

Hóast ein skipað fiskivinnugransking verður sett á stovn, kann ikki roknast við at tørvurin á sektorgransking og verkætlanir innan Fiski- og Vinnumástýrini fer at minka. Tað verður tí neyðugt at fíggja í hvussu er ein part av fiskivinnugranskingini við serstakari játtan, t.d. um nýggja Granskingargrunnin.



Um hugt verður eftir tali av akademiskum starvsfólkum á stovnum, sum í dag kunnu hugsast at samstarva um verkætlanir, eru á Fiskirannsóknarstovuni 14, á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum 7, á P/F Fiskaaling 1 (3 eru játtaði) og á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni 10.

Eitt ófrávikiligt krav er, at starvsfólkini á stovninum sleppa at/noyðast at meritera seg alla tíðina, t.d. við at skriva vísundaligar greinar til faklig rit við referees. Hesin háttur hevur verið brúktur á Fiskirannsóknarstovuni við góðum úrsliti. Tá fæst altjóða tign fyri eitt granskingarumhvørvi í Føroyum. Eisini er onnur publisering týdningarmikil fyri at kunna áhugaði um tey granskingarúrslit, sum eru fingin til vega.

## Tilmæli

Ein matvøruútbúgving í Føroyum á bachelor-stigi eigur at verða knýtt at t.d. Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Verkætlanir, sum tey lesandi skulu arbeiða við í sambandi við útbúgvingina, fara fram á menningardeildini á fiskiídnaðar- og havbúnaðardeplinum, har kanningarstova og royndarhøll er, og harvið góðar umstøður fyri hesum arbeiði. Endamálið við hesum má vera at økja virðið á tí tilfeingi vinnan í dag virkar til, og á henda hátt fáa økt um samlaða útflutningsvirðið.

Knýtt at fiskiídnaðargranskingini eigur ein kunningarfunktión at verða, sum skal taka sær av at verða bindilið millum samfelagið og granskingarumhvørvið í Føroyum og syrgja fyri, at granskingarúrslit verða almannakunngjørd. Vit skjóta somuleiðis upp, at álagt verður fiskiídnaðargranskingarstovninum at samarbeiða við aðrar almennar stovnar, soleiðis at vinnan eisini fær nyttu av tí vitan, sum í stóran mun er hjá starvsfólki á almennum stovnum, men sum í ov lítlan mun kemur vinnuni til nyttu.

## D Tænastur

### Alment um, hví tænastur av ymsum slagi eiga at fara fram á eini miðstøð saman við undirvísing og førleikamenning annars

Við ”tænastur” í hesum høpi verður serliga hugsað um 3 øki:

1) Kanningar, ið kunnu fara fram á væl útgjørdari starvsstovu
2) Høli har royndir við ymiskari framleiðslu og útgerð kann fara fram undir skipaðum viðurskiftum
3) Kunning um viðurskifti í fiski- og alivinnuni, her í millum eisini gerð av útbúgvingartilfari.

Eitt týðandi útgangsstøði er, at mett verður, at ein staðseting av hesum tænastuvirksemi í einum undirvísingar-, menningar- og granskingar-umhvørvi knýtir natúrligu viðskiftafólkini, tvs. vinnuna, nærri at staðnum - og øvugt. Á henda hátt kunnu partarnir út frá dagliga arbeiðinum hjá hvørjum øðrum síggja viðurskiftini í breiðari samanhangi og finna gongdar leiðir í felag.

### Tænastur til vinnuna

Í sambandi við útbúgvingar á Fiskivinnudeplinum er tørvur á eini undirvísingarkanningarstovu, har næmingar og skeiðsluttakarar á skúlanum gera royndir, sum eru partar av tí frálæru, tey fáa har. Avbjóðingin er at fyriskipa hetta soleiðis, at hendan undirvísingarkanningarstova eisini skal kunna gera kanningar fyri vinnuna.

Í sambandi við útbúgvingina og skeiðini, sum fara at verða fyriskipaði á Fiskiídnaðar- og havbúnaðardeplinum, hava næmingarnir og skeiðsluttakarar starvsstovuvenjingar, har teir gera kanningar, sum eru partar av frálæruni (alis-og evnafrøði, lívfrøði o.l.), umframt tær mest vanligu kanningarnar, sum verða gjørdar í vinnuni, eitt nú totalkim, TVN, pH, koliformar bakteriur o.s.fr. Hetta fyri, at næmingar og skeiðsluttakarar skulu fáa eina fatan av teimum kanningum, sum verða gjørdar í vinnuni og á henda hátt verða betri førir fyri at skilja og tulka hesi úrslit.

Kanningarnar, sum eru mest viðkomandi fyri førleikarnar hjá næmingunum/ skeiðsluttakarunum, tá tey koma út í vinnuna, eiga í størst møguligan mun at verða gjørdar í samband við vinnuna. Hetta kann gerast soleiðis, at sýnini, sum verða kannað, eiga at stava frá onkrum virki, og helst skulu næmingarnir sjálvir taka hesi sýni. Hugsast kundi, at tann einstaki næmingurin tosaði við umboð fyri virkið um at gera eina uppgávu ella verkætlan úti á virkinum, og við hesum fingið eitt samstarv í lag, sum bæði næmingur og vinna kunnu fáa okkurt burturúr. Møgu-

leikarnir eru nógvir, eitt nú at kanna eitt ávíst sóttreinsingarevni, við at gera yvirflatukanningar áðrenn og aftaná sóttreinsing, at kanna hvussu totalkim, $H_2S$ framleiðandi bakteriur og TVN økist í mun til aldurin á rávøruni, kanna ávísar parametrar á fleiri ávísum stigum gjøgnum framleiðsluna o.a.

Í hvønn mun undirvísingarkanningarstovan kann brúkast av vinnuni er ein fyriskipanarligur spurningur, sum støða má takast til. Hugsast kann, at á undirvísingarkanningarstovu skúlans verða kanningar gjørdar fyri vinnuna eisini. Hesar kanningar kunnu gerast, tá skúlin ikki brúkar kanningarstovuna, t.d. tveir dagar um vikuna . Kanningarnar, sum tá verða gjørdar eiga at vera rutinukanningar, sum vinnan hevur tørv á at fáa gjørdar.

Hesin parturin av virkseminum á kanningarstovu skúlans skal liva upp til øll minstakrøv til kanningarstovur, sum taka gjald fyri tænastur. Tað vil siga hava niðurskrivaðar mannagongdir fyri:

- sýnismóttøku, sýnismerking (sporføri), og handfaring av sýnum
- rutinur fyri trygd, neyvleika, reingerð og ordan
- kalibrering/eftirlit av útgerð, inkubatorum (temperaturkontrol) v.m.
- innkoyring/eftirmeting/útinnan av kanningum
- brúk av referensumateriali, har tað er til taks
- luttøku í interkalibreringum
- skráseting og rapportering av úrslitum

Ætlanin er **ikki** at fáa næmingarnar uppí hetta arbeiðið. Kanningar av hesum slag eiga og skulu vera gjørdar av fakfólki, sum í minsta lagi hava eina laborantútbúgving og sum harafturat hava fingið upplæring innan fyri tær kanningar, tey skulu gera. Hugsast kann tó, at tey, sum arbeiða á kanningarstovuni, eisini arbeiða á skúlanum (ella umvent) og undirvísa næmingum og skeiðsluttakarum á deplinum.

## Støðan sum er og tørvurin

Sum er, stendur Heilsufrøðiliga Starvsstovan fyri nærum øllum starvsstovukanningum, ið verða gjørdar í Føroyum, sum vinnulív og starvsstovan sjálv hava tørv á. Bert einstakar fyritøkur, sum t.d. Føroya Fiskavirking, Havsbrún og MBM, hava egna starvsstovu, ið gera kanningar av dagligu framleiðsluni.

Virksemið hjá kanningarstovunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hevur verið í støðugum vøkstri seinnu árini, og hesin vøkstur fer allarhelst at

standa við. Hetta hevur havt hølistrupulleikar við sær og starvsstovan hevur ikki havt umstøður at veita tænastur innan rímiliga tíð í ávísum tíðarskeiðum. Ætlanir eru um umbyggingar í fíggjarárinum 2001-2002, har játtaðar eru íalt 13 mió. kr. til at umbyggja starvsstovuna fyri, men uppskot er eisini komið fram um at byggja nýggja starvstovu í einum samtaki millum fleiri stovnar, har gransking er ein sera týðandi táttur.

So hvørt sum lógarkrøv og marknaðarkrøv broytast, er eyðsæð, at kanningarnar gerast alt fleiri. Seinasta dømið um hetta eru krøvini, sum ES setir føroyingum, um teir ynskja at gerast partur av heilsufrøðiliga samstarvinum, ið ES-lond hava. Í hesum sambandi krevur ES, at aldur fiskur skal kannast fyri medisinrestir eftir einari ávísari skipan fyri at kunna seljast á ES-marknaðinum. Somuleiðis at føroyingar hava eina starvsstovu, sum hevur førleika at kanna fiskasjúkur, og soleiðis kunna staðfesta sjúkustøðuna í føroysku alivinnuni til eina og hvørja tíð. Krøvini til góðskueftirlit sum heild verða væntandi eisini herd í framtíðini, og tí kann eisini væntast, at tørvurin á starvsstovukanningum økist. Í alivinnuni er eisini ein økjandi tørvur á kanningum, eftir at flest allar smoltstøðirnar endurnýta vatnið og tí hava tørv á at fylgja við vatngóðskuni. Somuleiðis er tørvur á at fáa tikið blóðroyndir av smolti, sum nú verður sett á sjógv árið runt, fyri at kanna eftir um tað er sjóbúgvið ella ikki.

Tað vil siga, at vit í tilmælinum ikki bert kunnu taka støði í talinum av starvsstovukanningum, sum verða gjørdar, men mugu eisini hava framtíðar tørvin í geyma.

Tá metast skal um, í hvønn mun tørvur er á eini undirvísingarkanningarstovu, nú fígging fyriliggur fyri at umbyggja kanningarstovuna hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, eigur man at gera sær púra greitt, hvussu raðfestingin er:

1. Er henda undirvísingarkanningarstova fyrst og fremst til, fyri at næmingarnir skulu fáa undirvísing, har undirvísingin er tætt tengd at vinnuni, soleiðis at vinnan eisini kann fáa eitt sindur burturúr ? ella
2. Er hetta ein undirvísingarkanningastova, sum fyrst og fremst skal kanna tað, vinnan hevur brúk fyri, sum næmingarnir so skulu rætta seg eftir í teirra undirvísing ?

Eftirsum talan er um ein **fiskivinnuskúla**, eigur tað at verða **undirvísingin** á undirvísingarkanningarstovuni, sum hevur hægstu raðfesting, júst sum víst í punkti 1 omanfyri.

Út frá einum undirvísingarsjónarmiði verður mett, at grundarlag er fyri einari undirvísingarkanningarstovu í landinum og kundi hetta verið ein kanningarstova, sum er serliga knýtt at fiskivinnuni, eftir sum at talan er um ein fiskivinnuskúla. Henda kanningarstova kundi so eisini tikið sær teimum mest vanligu kanningum, ið verða gjørdar. Áðrenn myndugleikarnir taka eina slíka avgerð, eigur Mentamálastýrið at kanna, í hvønn mun verandi kanningarstovur hjá undirvísingarverkinum hava veitt slíkar tænastur til vinnuna og í hvønn mun verandi kanningarstovur á skúlunum kunnu gerast til hesa undirvísingarkanningarstovuna, ið bólkurin her skýtur upp at stovnseta.

Sum er, sendir vinnan royndir til Íslands og til Danmarkar viðhvørt. Hetta eru rutinukanningar, ið kundu verið gjørdar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og kanningar, sum vinnan ikki ynskir at gera á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, orsakað av, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við vinnuni. Mongdin av hesum uppgávum er tó ikki so stór, at tað er grundgeving fyri at stovnseta enn eina kanningarstovu.

Út frá hesum kundi – út frá einum vinnuligum sjónarmiði – ein starvsstova, sum ikki hevur tilknýti til eftirlitsmyndugleikan, verið ynskilig. Her eru tað sjónarmiðini í pkt. 2, sum gera seg galdandi.

Tað kann somuleiðis sýnast skilagott at økja um starvsstovuorkuna í einum øki, har tørvurin á starvsstovukanningum er stórur. Á henda hátt er kanningarstovan nærri fjøldini av brúkarum og soleiðis kundi sambandið við viðskiftafólkini vorðið betri. Sambært einum yvirliti, sum vísir geografiska býtið av kanningum frá 1/4 - 2000 til 22/9 -2000, sæst, at tá talan er um mongdina av kanningunum, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger, stavar størsti parturin frá Eysturoynni og fiskiídnaðinum har.

Spurningurin er so, hvønn leiklut Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann hava í sambandi við eina nýggja starvsstovu. Hyggja vit t.d. eftir, hvussu MBM hevur bygt upp sítt starvsstovuvirksemi í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, so hevur MBM fingið fakligan stuðul og upplæring til kanningararbeiði, tó er tað einans MBM, sum hevur ábyrgdina av kanningunum. Hetta kundi eisini verið ein gongd leið fyri eina nýggja starvsstovu, har rutinukanningar fyri fiski- og alivinnuna kundi verið gjørdar.

Fíggjarliga kann ikki væntast, at starvsstovuvirksemið kemur at geva stórar inntøkur, men liggur starvsstovan saman við eini fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð, sum í hesum eginleika hevur starvsstovuútgerð, kann hetta virksemi verða við til at fáa ávísar inntøkur til eina slíka miðstøð.

## Royndarhøli

Møguleikar at gera royndir við ymiskum framleiðslutólum og framleiðsluhættum á sonevndum "pilotanleggum" kann vera ein máti at fáa vinnuna at menna seg og brúka ta vitan, sum er á granskingarstovnum. Hetta verður m.a. brúkt í okkara grannalondum, har leisturin t.d. er, at ein granskingarstovnur hevur høli til taks, har virki kunnu arbeiða við verkætlanum, og m.a. koma við framleiðslutólum at royndarkoyra. Tað kundi eisini verið virki ella granskingarstovnar, sum gera granskingarverkætlanir, sum nýta slík høli at gera royndir við t.d. hagreiðing av fiski, virkingarhættum o.s.fr. Úti á fiskavirkjum, har vanlig framleiðsla fer fram, kann vera trupult at finna hóskandi pláss og umstøður til slíkt virksemi. Tað vísir seg eisini, at tað enn er avmarkað, hvussu nógv vinnan ger við slíkt menningarvirksemi. Skulu framtíðarkrøvini til menning og nýskapan nøktast, má væntast, at vinnan fer at gera meira við slíkar royndir og var eitt slíkt høli tøkt, hevði tað óivað eggjað vinnuni at fara undir menningarvirksemi.

Talan er um eitt høli, har royndir við ymsum framleiðslum kunnu fara fram undir skipaðum viðurskiftum, við atliti at hitastýring, hagreiðing, reinføri, plássi o.t. Slík høli kunnu eisini nýtast til skeið og aðra undirvísing. Eitt samstarv millum vinnuna og eitt slíkt royndarhøli er av felags áhuga í einum fakligum umhvørvi, og eigur tí at verða partur av eini miðstøð.

## Kunningartænastur

Ein týdningarmikil liður í granskingar- og menningararbeiði er at fáa úrslitini út til almenningin. Ein fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð innan fiski- og alivinnuna eigur at hava eitt væl skipað kunningararbeiði, sum tekur sær av at almannakunngera áhugavert tilfar og framleggja hetta á ein hátt, soleiðis at føroyingurin, ikki minst skúlaungdómur okkara, skal kunna tilogna sær tað.

### Nevnt er t.d.:

- Kunningarrit kundi javnan komið út við úrslitum frá ymsum kanningum
- Frágreiðingar um ymsar verkætlanir, ið fara fram innan vinnuna, verða givnar út
- Undirvísingartilfar í fiskivinnuviðurskiftum
- Kunning um vinnuna sum heild

Vantandi vitan um hesi viðurskifti eigur óivað sín lut í lítla áhuganum millum ungdómin fyri øllum, sum ber brá av fiski. Skulu vit økja um til-

gongdina av fólki til fiskivinnuna, má størri dentur tí leggjast á henda partin. Fer kunningin fram út frá einum umhvørvi við kønum fólki á viðkomandi økjum, ið aftur hava samband við líknandi stovnar í útlondum, kann væntast, at hon fer at verða munadygg og elva til ta umrøðu í fjølmiðlunum, sum er so umráðandi fyri áhugan hjá fólki. Við tað, at fleiri stovnar hava tørv á kunningarfólki, ber til at samstarva um eina slíka tænastu, t.d. við stovnarnar á Debesartrøð. Tøkniliga eigur stórur dentur at verða lagdur á KT og internet sum miðil í kunningararbeiðinum, soleiðis sum longu verður gjørt í grannalondum okkara.

## Tilmæli

Bólkurin metir, at tað eigur at vera møguligt at uppbyggja undirvísingarstarvsstovu-, umframt royndar- og kunningartænastur í sambandi við eina fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð.

Tá ið talan er um undirvísingarstarvsstovupartin, eiga fyrireikingarnar at fara fram í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, soleiðis at hon kann veita góð ráð og uppvenjing av starvsfólki. Tað er av stórum týdningi, at ein samlað loysn kemur burtur úr á starvsstovuøkinum, og at pláss bæði er fyri eini starvsstovu, ið kann nøkta øll akkrediteringskrøv, og so eini minni undirvísingarkanningarstovu, ið er rættað móti fiski- og alivinnuni, soleiðis at eitt av endamálinum við eini fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð kann røkkast, nevniliga, at vinnan og skúli hava felags møtistað.

Bólkurin metir eisini, at tað er av stórum týdningi fyri víðari menning av fiskivinnuni, at royndarhølir eru, sum til ber at leiga at gera royndir í, antin virkini sjálvi ella við hjálp frá miðstøðini.

Hvat viðvíkur umstøðunum at almannakunngera granskingarúrslit ella at fáa hesi umskrivaði til frálærutilfar, metir bólkurin tað vera virðismikið, at umstøður verða skaptar til hetta, fyri at gera fiskivinnuna og granskingina innan økið meira fólksliga og viðkomandi fyri føroyingar.

# E Kort yvir havbúnaðin og fiskiídnaðin í Føroyum




**Lívfiskastøðir**

L1: Fiskaaling
L2: Fiskaaling
L3: Fútaklettur

**Alistøðir**

A1: Polarlaks
A2: East Salmon
A3: Hellisvað
A4:Taravík
A5: Faroe Salmon
A6: Funningslaks
A7: Norðaling
A8: Alilaks
A9: Enni
A10: Luna
A11: Alist. á Bakka
A12: Laksaaling
A13: Sjólaksur
A14: Vestlaks
A15: Navir
A16: Kaldbaks Laksaaling
A17: Hólmalaks
A18: Gulin
A19: Sørvágslaks
A20: Salmon River
A21: Sílaaling
A22: Atlantic Seafarm
A23: Sumba Laks

**Smoltstøðir**

S1: Gulin
S2: Vestsmolt
S3: East Salmon
S4: Gjáarsmolt
S5: Áarstøð
S6: Norðsmolt
S7: Laxá
S8: Sandá
S9: Sýnin
S10: Smst. á Bakka
S11: Fiskaaling
S12: Fossáaling
S13: Dalásmolt
S14: Stiðjafjall
S15: Fútaklettur
S16: Guttanstøð
S17: Hovsá
S18: Siglufelli
S19: Faroe Smolt
S20: Røkt

**Onnur fiskasløg**

K1: Fiskaaling




## Flakavirki
F1: Kósin Seafood
F2: Pure-Water Seafood
F3: Maru-Seafood
F4: Norfra
F5: Norðurfisk
F6: Kjartan Joensen
F7: Tavan
F8: Fiskavirkið í Gøtu
F9: FFV Toftir
F10: FFV Runavík
F11: Nevið Seafood
F12: Vaðhorn Seafood
F13: Norðís Seafood
F14: FarIta
F15: FFV-Vestmanna
F16: FFV- Tórshavn
F17: Kaldbak Seafood
F18: Fagralíð
F19: Sørvágs Flakavirkið
F20: FFV-Miðvági
F21: Sandoy Seafood
F22: Hamranes
F23: Delta Seafood
F24: FFV Tvøroyri
F25: Palm Seafood
F26: JMA
F27: Sancy Seafood
F28: Kvilthamar

## Roykivirki
R1: Norðís Seafood
R2: Roykivirki í Porkeri
R3: Pure-Water Seafood

## Laksavirki
L1: Bakkafrost í Runavík
L2: Eastsalmon í Fuglafirði

## Kryvjivirki
K1: Eastsalmon
K2: NFCS
K3: Fiskavirkið í Gøtu
K4: Kassavirkið á Bakka
K5:Vestlaks
K6: Atlantis
K7: Sørvágslaks
K8: Suðurlaks
K9: Viking Seafood

## F Nøkur sjónarmið um framtíðar førleikar

### Egil Olsen:

*Føroyska fiski- og alivinnan hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið, bæði tá tað snýr seg um virksemi, útflutningsinntøkur og avleitt virksemi sum heild til alt samfelagið. Fiski- og alivinnan hevur sera stórar menningarmøguleikar og hevur nógv at bjóða teimum, sum ynskja at arbeiða - beinleiðis ella óbeinleiðis - við fiski ella mati úr sjónum.*

*Føroyingar útflyta nógv ymisk fiskasløg til nógvar ymiskar marknaðir. Kappingin á marknaðinum er sera hørð. Tann tøkniliga menningin fer fram við øgiligari ferð, t.d. innan lívtøkni, nýggj fiskasløg koma fram og arbeiðsmarknaðurin er í stórari broyting.*

*Tað er ein rúgva av yrkjum, sum eru knýtt til fiski- og alivinnuni, og tað er tørvur á einum breiðum úrvali av kunnleika - frá lívfrøðiligari vitan, vitan um marknaðarbúskap til fyriskipanarligan og fyrisitingarligan kunnleika.*

*Tann føroyski ungdómurin - gentur og dreingir – skal vera við til at menna fiski- og alivinnuna víðari og seta á stovn tey virkini, sum vit skulu liva av komandi øldirnar. Eg síggi tí rekruttering og vitanarhækking sum sera týdningarmiklar uppgávur fyri vinnuna og tað almenna.*

*Ta størstu ábygdina í sambandi við rekrutteringina liggur tó hjá vinnuni sjálvari. Avbjóðingin fyri vinnuna í hesum sambandi er at vísa sítt andlit sum ein áhugaverd vinna við nógvum møguleikum fyri bæði arbeiðsfólk, millumleiðarar, leiðslufólk og granskarar.*

*Egil Olsen, menningarleiðari, Sandoy Seafood*

### Páll Gregersen:

*Góð arbeiðsviðurskifti í fiskivinnuni er ein av fyritreytunum fyri at fáa fólk at støðast í vinnuni. Tað veri seg arbeiðsfólk ella fólk í leiðandi størvum.*

*Okkara høvuðsvinna hevur seinnu árini staðið fyri stórum broytingum í rammuviðurskiftunum og hevur broytt seg frá at vera ein skuldartyngd vinna til eina vinnu, sum vinnur pening á kappingarførum grundarlagi.*

*Fyri at føroyska fiski- og alivinnan í framtíðini skal mennast enn meira, er tað av týdningi, at dentur verður lagdur á gransking og menning av*

*vinnuni. Henda menning kann bert fara fram, um tilgongd er av arbeiðsmegi við førleikum innan framleiðslu, búskap, matvørutøkni, biotøkni, KT og marknaðaviðurskifti o.s.fr.*

*Ísland og serliga Noreg hava seinnu árini gjørt nógv burturúr at menna fiski- og alivinnuna, við at leggja dent á týdningin av rekruttering av starvsfólki inn í vinnuni. Hesa avbjóðingina mugu vit eisini taka í Føroyum og arbeiða miðvíst við at fáa røttu fólkini at velja vinnuna sum sítt arbeiðsstað.*

*Páll Gregersen, stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu og*
*formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag*

**Símun Joensen:**

*Í skrivi dagfest 1. februar 2001 verði eg biðin um at siga frá, hvønn tørv alivinnan hevur á útbúnum fólki. Av tí at eg siti í starvi, sum er nærri knýtt at alivinnuni á landi, tvs. smoltvinnuni og av tí at Fiskaaling hevur serligan tørv, við tí virksemi vit hava, verður mín meting merkt av hesum viðurskiftum. Alivinnan á sjónum hevur møguliga tørv á fólki við eitt sindur øðrvísi útbúgving.*

*Í mínum svari býti eg tørvin í tvey, nevniliga fólk, sum skulu starvast sum røktarar og møguliga millumleiðarar og so fólk við hægri útbúgving, sum skulu arbeiða við menning og gransking.*

*Av tí at vinnan seinastu árini er sera nógv ment tekniskt og hevur tikið í nýtslu nýggja tøkni, eru krøvini til røktarar og millumleiðarar munandi herd. Eg meti, at vinnan til hesi størv hevur tørv á starvsfólki, sum hava eina rímiliga vitan innan mikrobiologi, kemi, og biokemi. Hartil er ynskiligt, at hesi starvsfólk hava eitt rímiligt innlit í biologi, fóður og fóðringslæru og í teknisk viðurskifti, sum t.d ilting av vatni, útskifting av vatni í kørum v.m. Tann útbúgving hesi fólk fáa, skal vera skipað á ein slíkan hátt, at tey skilja samanhangirnar og ávirkanina millum tey ymisku viðurskiftini, sum ávirka trivnaðin hjá fiskinum. Eitt sjálvsagt krav er, at starvsfólk hava vitan innan teld á rímuligum brúkarastøði.*

*Viðvíkjandi tørvinum á fólki til granskingarendamál er stutt at viðmerkja, at her er talan um tørv á starvsfólki, sum hevur útbúgving frá hægri lærustovni innan biologi, genetik, statistikk og molekylær genetik. Hesin tørvur vil møguliga skifta, alt eftir hvørjum økjum granskað verður í, men*

*tað vil tó altíð verða tørvur á starvsfólki innan hesi øki í okkara verandi umstøðum. Eftir mínum tykki verður tað ein avgjørd treyt fyri framhaldandi menning av føroysku alivinnuni, at skaptar verða umstøður, sum gera tað møguligt at menna granskingina á fleiri økjum, til tess at hava møguleika at skapa eina kappingarføra alivinnu, eisini inn í framtíðina.*

*Símun Joensen, stjóri á Fiskaaling*

**Álit um útbúgvingar innan fiskivinnuna**

Handað landsstýrismanninum 27. juni 2001

Álitið kann takast niður frá www.mms.fo

Uppseting: Repro-Z

